BÚSKAPARRÁÐIÐ

**Heystið**

# 2024

# Føroyski búskapurin

## Konjunkturfrágreiðing á heysti 2024

September 2024

Economic report from the Economic Council of the Faroe Islands, Autumn 2024.

# Búskaparráðið

Búskaparráðið hevur til uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og veita óhefta búskaparliga ráðgeving og gera frágreiðingar um búskaparligu gongdina. Skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum er við løgtingslóg nr. 72 frá 10. mai 2021 løgd til Landsbanka Føroya at røkja, og Búskaparráðið gevur við hesum út konjunkturfrágreiðingina, sum eftir lóg um Búskaparráð skal gerast tvær ferðir árliga; ávikavist tann 1. mars og 1. september.

Frágreiðingin liggur tøk at taka niður sum pdf-fílu á heimasíðuni hjá Landsbanka Føroya:
https://www.landsbankin.fo/fo-fo/buskaparraðið/fragreiðingar

Limir Búskaparráðsins eru:
Johnny í Grótinum, formaður, cand.polit
Anja Rein, Diplomútbúgving innan banka og MSc í leiðslu
Hans Ellefsen, PhD. í búskaparfrøði
Jan Otto S. Holm, cand.merc.fir
Marjun Weihe Thomassen, cand.merc.aef

Skrivarar Búskaparráðsins: Landsbanki Føroya, samstarv er við Hagstovu Føroya.

ISBN: 978-99918-3-844-1

# Innihaldsyvirlit

Samandráttur ..... 4

Konjunkturfrágreiðing heystið 2024 ..... 6

1. Búskaparligar ábendingar ..... 7

Meting av vøkstrinum í BTÚ ..... 7

Inflatión og rentur ..... 8

Altjóða útlit ..... 9

Arbeiðsmarknaðurin ..... 9

2. Húsarhaldini ..... 13

Treysti ..... 13

Nýtsla ..... 14

Bústaðarbyrða ..... 15

3. Vinnan ..... 16

Byggivinnan ..... 17

Privata tænastuvinnan ..... 17

Handilsvinnan ..... 18

Tænastuvinnan ..... 18

Tilfeingisvinnur ..... 18

4. Handil og útflutningur ..... 21

Handilsjavni ..... 21

Vøruútflutningur ..... 22

5. Almenna fíggjarstøðan og útlit ..... 24

Úrslitið á almennu roknskapunum ..... 24

Nýtslan hjá almennari fyrisiting og tænastu ..... 26

Íløgur almenna geirans ..... 28

Fíggjarpolitiskt regluverk ..... 29

Keldur ..... 31

Fylgiskjal ..... 32

English summary ..... 33

# Samandráttur

## Búskapurin framvegis undir trýsti

Búskaparráðið hevur gjørt eina dagførda meting av vøkstrinum í BTÚ fyri árini 2024 – 2025. Metingin av vøkstrinum í BTÚ fyri 2023 - 2025 verður gjørd í leypandi prísum, og er mettur at verða ávikavist 5,6% í 2023, 4,7% í 2024 og 3,3% í 2025.

Reali búskaparvøksturin í 2023 er enn ikki uppgjørdur, og metingin av BTÚ fyri 2023, 2024 og 2025 er einans gjørd í leypandi prísum. Gongdin í starvsfólkatalinum kann geva eina ábending um realvøksturin; starvsfólkatalið er vaksið seinastu árini. Talið av starvsfólkum vaks 1% í tíðarskeiðinum juli 2023 til juni 2024, samanborið við sama tíðarskeið árið fyri. Metti vøksturin í leypandi prísum er sløk fimm prosent, meðan inflatiónin er trý prosent í løtuni. Eisini sæst vaksandi virksemið aftur í, at talið av útlendingum á arbeiðsmarknaðinum framvegis veksur. At enda kann vísast á, at lønargjaldingarnar eru øktar 6% í 12 mánaðar tíðarskeiðinum til juni 2024, samanborið við sama tíðarskeið árið fyri.

**BTÚ og BTÚ vøkstur í leypandi prísum**

| | 2021 | 2022 | *2023* | *2024* | *2025* |
|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ mió. kr. | 22.980 | 25.162 | *26.578* | *27.822* | *28.730* |
| Árligur vøkstur í BTÚ | 7,7% | 9,5% | *5,6%* | *4,7%* | *3,3%* |

**Viðm.:** 2021 og 2022 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2023, 2024 og 2025 eru metingar hjá Búskaparráðnum.
**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið

Vísitalið fyri bjartskygnið hjá húsarhaldunum er hægri í nýggjastu brúkarakanningini hjá Hagstovu Føroya sammett við kanningini í januar 2024 og kann tað hanga saman við, at mong hava fingið lønarhækkan og skattalætta, og harumframt eru útlit til lækkandi rentur. Prísirnir veksa ikki longur við somu ferð, sum teir gjørdu fyri tveimum árum síðani og brúkaraprístalið hækkaði í øðrum ársfjórðingi við 3,0% samanborið við sama ársfjórðing í fjør. Prísvøksturin stavaði serliga frá rentuútreiðslum til býli og frá prísinum á brenniolju. Matvøruprísirnir hækkaðu eisini, men við lægri ferð enn tey síðstu tvey árini. Arbeiði er til allar hendur, og arbeiðsloysið er framvegis sera lágt; tað var 1,1% í juli 2024.

Góða bjartskygnið hjá húsarhaldunum sæst aftur í vísitalinum fyri bjartskygni í bæði handils- og tænastuvinnuni. Í byggivinnuni verður mett, at tørvurin á arbeiðsmegi gerst lægri komandi árið, men talið av mánaðum við tryggjaðum arbeiði er óbroytt. Í tilfeingisvinnuni er bjartskygnið hinvegin lækkað nakað. Kvoturnar av bæði sild og makrel eru minkaðar í 2024 samanborið við 2023, millum annað orsakað av nýggju strandarlandaavtaluni um makrelin, og somuleiðis lækkar toskakvotan í Barentshavinum í 2024 og 2025. Tøkan av laksi er tó økt, og saman við eini øktari svartkjaftakvotu, er útflutningurin samanumtikið við til at toga vøksturin í BTÚ upp í 2024.

Innflutningurin er minkaður í fyrra hálvári 2024 samanborið við sama tíðarskeið árið fyri, ið millum annað kemur av lægri innflutningi av skipum, ráevni og brennievni. Útflutningurin er somuleiðis minkaður, men ikki eins nógv sum innflutningurin, og tað er tí framvegis avlop á handilsjavnanum (juni 2024).

Meklarar greiða frá, at tey sum fyrstu ferð skulu keypa býli hava torført við at sleppa inn á sethúsamarknaðin, serliga í miðstaðarøkinum. Fleiri leita sær útum miðstaðarøkið av somu orsøk. Harafturat er byggitilfarið dýrkað nógv, ið ger, at fólk eru afturhaldin at byggja nýtt. Mangul á bústøðum er ein týðandi fløskuhálsur, sum er við til at forða fyri framhaldandi fólka- og búskaparvøkstri í Føroyum. Tí áttu kommunur við stórum fólkavøkstri at framskunda útstykkingar av grundstykkjum, serliga til bygging av íbúðum og øðrum smærri bústaðareindum, so bráfeingistørvurin skjótari verður nøktaður. Landið eigur somuleiðis at gera sítt íkast við at byggja leigubústaðir.

Eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi er stórur, og ein háttur at økja um arbeiðsfjøldina í Føroyum er at fáa útlendingar til Føroya at arbeiða. Arbeiðsmarknaðarpolitiskt eigur tó at vera syrgt fyri, at útlendska arbeiðsmegin, sum kemur til Føroyar, nøktar ein tørv, ið er virðisskapandi fyri føroyska búskapinum. Fleiri av starvsfólkunum, ið eru komin til Føroya umvegis Fast Track skipanina fyri triðjalond, arbeiða á fiska-

og kryvjivirkjum, og hesi eru tí fevnd av fiskavirkisskipanini. Sambært frágreiðing hjá ALS vóru góð 1.500 fólk í fiskavirkisskipanini í 2023, og av hesum vóru sløk 40% útlendingar. Sambært ALS eru enntá dømi um, at arbeiðsloysisstuðulin so at siga er grundarlagið undir uppihaldinum í Føroyum hjá summum útlendingum. Fiskavirkisskipanin forðar eisini arbeiðsmegi at leita sær til vinnur har, hon hevði givið størri íkast til búskapin og virðiskipanina í Føroyum. Samhaldsfastar skipanir, sum fiskavirkisskipanin, ið allir løntakarar og arbeiðsgevarar í Føroyum eru við til at fíggja, eiga ikki at vera nýttar til at tryggja, at arbeiðsgevarar kunnu lúka arbeiðskravið á 40 tímar um vikuna.

Trotið á arbeiðsmegi fer at veksa mong ár fram orsakað av demografisku gongdini. At hækka pensjónsaldurin økir um arbeiðsútboðið. Hækkar pensjónsaldurin ikki so hvørt sum liviárini gerast fleiri, førir tað til eina ójavnvág millum hækkandi útreiðslur til pensjón og tær lutfalsliga færri skattainntøkurnar frá arbeiðsinntøkum. Restlivitíðin sum pensjónistur er longu hækkað við 4 árum síðani 1988, tí pensjónsaldurin ikki er øktur við hækkandi livialdrinum. Neyðugt er tí at seta ferðina upp á javningini á áramálunum í ávikavist arbeiðs- og pensjónslívinum. Hetta er púra avgerandi fyri at fáa haldføri í fíggjarpolitikkin.

Búskaparráðið metir hallið á fíggjarlógini at verða slakar 560 í 2024 og 280 mió. kr. í 2025, tá atlit verður tikið til, at ikki allar inntøkurnar frá veiðigjaldinum og tøkugjaldinum er tøkar hjá politisku myndugleikunum at ráða yvir í 2024 og 2025, tí ein partur skal í Búskapargrunnin. Eitt endamál við Búskapargrunninum er at virka fyri javning av tilfeingisinntøkunum frá fiski- og alivinnuni. Hetta verður gjørt við at gjalda 250 mió. kr. úr grunninum inn á fíggjarlógina sama ár frá fiskivinnuni, og 150 mió. kr. frá alivinnuni. Inntøkur frá fiski- og alivinnuni, ið fara uppum hesar inntøkur, fara í búskapargrunnin og verða javnaðar út yvir 7 ár. Fíggjarmálaráðið hevur tó ætlanir um hækka upphæddirnar, sum fara beinleiðis inn á fíggjarlógina. Fyri fiskivinnuna verður upphæddin hækkað frá 250 mió. kr. til 350 mió. kr. og fyri alivinnuna frá 150 mió. kr. til 250 mió. kr. Hetta merkir, at inntøkur landskassans hervið verða uppaftur meira viðkvæmar yvirfyri sveiggjum í fiski- og alivinnuni, og at endamálið við at javna inntøkurnar frá veiði- og tøkugjøldum í væl minni mun verður rokkið.

Landsstýrið eigur at gera langtíðarætlanir fyri fíggjarligu gongdina hjá landskassa og kommunum undir einum, tí stórar avbjóðingar eru fyri framman orsakað av demografisku gongdini. Tað er ikki nokk at pjøssa uppá fíggjarlógina við óítøkiligum átøkum fyri 35 mió. kr. um árið, sum ætlanin er, sambært kørmunum hjá Fíggjarmálaráðnum. Neyðugt er við nýskipanum, sum veruliga muna, fyri at fáa fíggjarpolitikkin aftur á beint. Heilt ítøkiliga fer ein nýskipan, har pensjónsaldurin verður hækkaður og frameftir fylgir væntaðu økingini í livialdrinum, saman við effektiviseringum í almenna geiranum, gera stóran mun til at tryggja fíggjarpolitiska haldførið.

Fíggjarpolitiskt regluverk er aftur komið á politisku dagsskránna í Føroyum. Í ólavsøkurøðu løgmans varð soleiðis boðað frá, at samgongan ynskir at *"finna semju um eitt fíggjarpolitiskt regluverk, sum avmarkar, hvussu nógvar pengar vit politikarar kunnu brúka, og tryggjar, at alt, vit gera, er fíggjað".* Hetta tekur Búskaparráðið fult undir við og heitir enn eina ferð á politisku skipanina um at seta í verk slíkt fíggjarpolitiskt regluverk. Vísast kann á, at slík regluverk longu eru lógarfest í flestu av grannalondum okkara.

Staðfestast má tó eisini, at áleið ein triðingur av almennu nýtsluni er skipaður í kommunala geiranum. Tí er alneyðugt, at eitt fíggjarpolitiskt regluverk fevnir um allan tann almenna geiran og ikki bert landsins fíggjarstýring.

# Konjunkturfrágreiðing heystið 2024

# 1. Búskaparligar ábendingar

## Meting av vøkstrinum í BTÚ

Búskaparráðið hevur, í samstarvi við Hagstovu Føroya, mett um vøksturin í BTÚ fyri árini 2023 – 2025. Metingarnar av BTÚ verða gjørdar í leypandi prísum. Vøksturin í BTÚ er mettur til at verða ávikavist 5,6% í 2023, 4,7% í 2024 og 3,3% í 2025[1], sí talvu 1.1.

**Talva 1.1: BTÚ og BTÚ vøkstur í leypandi prísum**

| | **2021** | **2022** | ***2023*** | ***2024*** | ***2025*** |
|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ mió. kr. | 22.980 | 25.162 | *26.578* | *27.822* | *28.730* |
| Árligur vøkstur í BTÚ | 7,7% | 9,5% | *5,6%* | *4,7%* | *3,3%* |

**Viðm.:** 2021 og 2022 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2023, 2024 og 2025 eru metingar hjá Búskaparráðnum.
**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið

Talvan omanfyri vísir eisini uppgjørdu bruttotjóðarúrtøkuna fyri 2021 og 2022 og vøksturin tey árini. Uppgjørda BTÚ var í 2022 25,2 mia. kr. og mett at verða 26,6 mia. kr. í 2023, 27,8 mia. kr. í 2024 og 28,7 mia. kr. í 2025. Til metingina av vøkstrinum í BTÚ er nýttur ein búskaparmyndil til framrokningar, sum upprunaliga varð mentur í Landsbankanum og síðani á Hagstovuni, og hann verður viðlíkahildin av Hagstovuni og Búskaparráðnum í felag.

Mynd 1.1 vísir vøksturin í BTÚ saman við vakstrarískoytunum. Vakstrarískoytini eru býtt á ávikavist privata nýtslu og íløgur, almenna nýtslu og íløgur, útflutning, innflutning og broytingar í goymslunum. Er innflutningurin størri enn árið fyri, gevur tað eitt negativt íkast til BTÚ vøksturin, tí innflutningurin so at siga er ein útreiðsla hjá føroyska búskapinum, meðan øktur útflutningur merkir økta inntøku til føroyska búskapin. Økir tað almenna ella privata sína nýtslu ella íløguvirksemi, merkir tað, at fleiri vørur ella tænastur eru keyptar samanborið við árið fyri, sum er ein inntøka hjá onkrum parti av føroyska búskapinum, sí eisini talvu F.1. í fylgiskjali 1.

**Mynd 1.1: BTÚ vøkstur í leypandi prísum og vaksrarískoyti**
2020-2025




**Viðm.:** 2021 og 2022 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2023, 2024 og 2025 eru metingar hjá Búskaparráðnum.
**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið

**Privata nýtslan** gevur eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í metingini fyri 2024, og somuleiðis eitt positivt, men minni ískoyti í 2025. Treystið hjá føroysku húsarhaldunum er sambært konjunkturbarometrinum hækkað eitt vet í juni 2024 samanborið við januar 2024. Væntanir um lækkandi rentu og inflatión,og við lønarhækkan og skattalætta í 2024, styrkir keypiorkuna og viðvirkar sannlíkt til,

[1] Í heyst 2023 metti Búskaparráðið í samstarvi við Hagstovu Føroya, at vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fór at verða 5,9% í 2023 og 1,4% í 2024.

at fíggjarligu útlitini eru bjartari. Ískoytini frá privatu nýtsluni vóru størri í 2022 og 2023, og tað kom av høgu inflatiónini, ið hevði við sær, at húsarhaldini, vegna øktar prísir, nýttu ein størri part av síni inntøku til vanligu nýtsluna.

**Privatu íløgurnar** geva samanlagt eitt negativt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2024, tí íløguvirksemið hjá privatu vinnuni er mett at verða lægri í 2024 enn árið fyri. Privatu íløgurnar fevna um íløgurnar frá húsarhaldunum, privatu vinnuni og fyritøkunum undir almennum ræði, sum framleiða vørur og tænastur til marknaðin. Íløguvirksemið hjá húsarhaldunum er mett at vera minni í 2024 enn í 2023 vegna hægri rentustøði og inflatión, ið ávirkar, hvussu stór krøv verða sett til tiltøkupeningin, tá ið húsarhald biðja um bústaðarfígging. Meklarar hava somuleiðis greitt frá, at húsarhaldini eru vorðin meira afturhaldin við at byggja nýtt. Íløguvirksemið hjá fyritøkum undir almennum ræði er størri í 2024 enn í 2023, ið millum annað skyldast íløgunum hjá SEV, Vága floghavn og Atlantic Airways. Í 2025 geva íløgurnar aftur eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ.

**Almenna nýtslan** gevur eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2024 og 2025, orsakað av øktum lønarútreiðslum. Í nøkrum av vælferðarøkjunum, hava verið bæði lønarhækkingar og lønarlyft. Harafturat veksa almennu útreiðslurnar til fólkapensjónir vegna einum størri tali av pensjónistum. Lønargjaldingarnar veksa somuleiðis hjá kommununum hesi bæði árini innan eldrarøkt og barnaansing.

**Almennu íløgurnar** geva eitt positivt íkast til BTÚ í 2024, men negativt íkast í 2025, tí almennu íløgurnar lækka í 2025 samanborið við 2024, tí fleiri stórar verkætlanir vera lidnar í 2024.

**Útflutningurin** gav eitt stórt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ 2023, serliga orsakað av øktum útflutningi av fiskamjøli og lýsi og serstakliga høgum fiska- og lýsiprísum, men útflutningurin av lýsi verður ikki eins stórur í 2024. Í 2024 lækkar føroyska kvotan av makreli og sild, meðan svartkjaftakvotan hækkar. Lægra kvotan av makreli verður tó partvíst uppvigað av hægri makrelprísum. Veiðan av toski undir Føroyum fellur væntandi í 2024. Kvotan í Barentshavinum fellur í 2024 og allarhelst eisini í 2025. Tøkan av alifiski hevur á hinari síðuni gingið væl í 2024 og er mett at gerast upp móti 14% størri í 2024 enn í 2023. Samanumtikið gevur útflutningurin tí eitt positivt íkast til vøksturin í BTÚ í 2024. Útflutningurin í 2025 er meira torførur at meta um. Væntanir eru um, at toskakvotan í Barentshavinum og kvotan av norðhavssild lækkar aftur í 2025, meðan tøkunøgdin av laksi møguliga kvinkar eitt vet uppeftir. Mett verður, at útflutningurin fer at geva eitt negativt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2025.

**Innflutningurin** gevur eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ, tí innflutningurin er mettur at gerast minni í 2024 samanborið við 2023. Innflutningurin minkaði við 850 mió. kr. í fyrra hálvári 2024 samanborið við fyrra hálvári 2023, vegna millum annað lægri innflutning av skipum, ráevni og brennievni[2]. Verkfallið hevði eisini ávirkan á innflutningin í mai og juni. Í 2025 verður ískoytið frá innflutninginum negativt, tí innflutningsvirðið tá er mett at veksa í mun til í 2024.

## Inflatión og rentur

Brúkaraprístalið hækkaði í øðrum ársfjórðingi við 3,0% samanborið við sama ársfjórðing í fjør, sí mynd 1.2. Prísvøksturin stavaði serliga frá rentuútreiðslum til býli og frá prísinum á brenniolju. Matvøruprísirnir hækkaðu eisini, men við lægri ferð enn tey síðstu tvey árini. Bankarnir boðaðu frá rentulækking í juli, men henda rentulækking er ikki við í hagtølunum fyri brúkaraprístalið í øðrum ársfjórðingi 2024. Samanborið við grannalondini er inflatiónin í Føroyum (3,0%) eitt sindur hægri enn í Danmark (2,2%), á sama støði sum í Noreg og eitt sindur lægri, enn í Svøríki (3,7%) og Íslandi (5,8%)[3]. Í Danmark er brúkaraprístalið einans vaksið við 1,1% í juli 2024 samanborið við sama mánað árið fyri. Ein av orsøkunum til lágu inflatiónina í Danmark er, at prísvøksturin á ravmagni í Danmark var munandi lægri í juli 2024, enn í sama mánað árið fyri. Harumframt eru prísirnar á vørum lækkaðir í Danmark hetta seinasta árið, ið serliga kemur av lægri prísum á nýggjum bilum, húsbúnaði og húsarhaldsútgerð.

[2] Hagstova Føroya, tíðindi 16. august 2024.
[3] Hagstova Føroya, tíðindi 8. juli 2024

**Mynd 1.2: Inflatión, %-broyting í brúkaraprístalinum**
Feb. 2020 til mai. 2024




**Viðm.:** Prosentbroyting í brúkaraprístalinum í mun til sama ársfjórðing árið fyri.
**Kelda:** Hagstova Føroya

Sambært peningastovnunum eru tað ikki fleiri húsarhald, enn vanligt, sum biðja um skáar, og trotini eru ikki størri, enn tey plaga at vera. Bankarnir meta, at privatkundarnir eru vorðnir eitt sindur meira varnir síðani rentan og prísstøðið byrjaði at hækka, tá ið tey skulu keypa bil ella sethús. Líkt er til, at føroysku húsarhaldini hava fíggjarligt rásarúm til at kunna lofta øktu rentuútreiðslunum og dýrkaða livikostnaðinum higartil, men enn er ov tíðliga at siga, um vit hava sæð allar avleiðingarnar av mongu rentuhækkingunum, siga peningastovnarnir.

## Altjóða útlit

Sambært meting hjá altjóða gjaldoyragrunninum, IMF, er høga prísstøðið í tænastuvinnunum við til at halda inflatiónini uppi, ið kann viðvirka til, at renturnar ikki lækka eins skjótt, sum upprunaliga væntað. Serliga búskapurin í USA hevur víst seg at vera sterkari enn væntað. Geopolitiskar óvissur og handilsligar ósemjur millum lond eru harafturat øktar í seinastuni. IMF væntar at vøksturin í heimsbúskapinum verður 3,2% í 2024 og 3,3% í 2025 í føstum prísum (IMF, juli 2024). Tað er tó sannlíkt, at miðbankaskipanin í USA, Fed, fer at gera sína fyrstu rentulækking í longri tíð nú í september 2024.

Í Evru-økinum væntast at koma búskaparvøkstur aftur í 2024. Vøksturin kemur tó frá einum lágum stigi, tí eftirárinini av herdum pengapolitikki, høgum orkuprísum og herdum fíggjarkrøvum hava havt sína ávirkan á virksemið í Evropa. Høgar lønarhækkingar og høg inflatión í tænastugeiranum kann seinka tilgongdini at fáa inflatiónina niður á 2%, sum evropeiski miðbankin, ECB, miðar eftir. Hetta kann seinka rentulækkingum. ECB hevur tó longu lækkað rentuna einaferð (juni 2024), og marknaðurin væntar, at tað kemur ein rentulækking afturat á fundinum hjá ECB í september. Sambært ECB, er inflatiónin í Evropa mett at lækka frá 2,5% í 2024 til 2,2% í 2025 og 1,9% 2026 (ECB, juni 2024)[4].

## Arbeiðsmarknaðurin

At tað hevur gingið væl í búskapinum seinastu 10 árini sæst aftur á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Løntakaratalið er høgt og arbeiðsloysið er framvegis á einum sera lágum støði, sí mynd 1.3. Lága arbeiðsloysið á umleið 1% merkir, at arbeiði er til allar hendur, sum er positivt fyri húsarhaldini. Búskaparliga hevur eitt ov lágt arbeiðsloysi í longri tíð tó ta avleiðing, at framleiðslan í landinum verður minni, enn hvat hon kundi havt verið um trot ikki var á arbeiðsmegi, og fløskuhálsar kunnu koma vegna trot á arbeiðsmegi. Trot á arbeiðsmegi kann harumframt elva til lønartrýst, tá stórur eftirspurningur er eftir arbeiðsmegi og útboðið er avmarkað.

[4] World economic outlook update, July 2024, IMF.org., Economic Bulletin Issue 4, June 2024. ecb.europa.eu., "ECB may need to cut interest rates again in Sept, Rehn says", Reuters 20. August 2024.

**Mynd 1.3: Tal av starvsfólkum og fulltíðararbeiðsleysum, Árstíðarjavnað**
Jan. 2014 til Jul. 2024




**Kelda:** Hagstova Føroya

Talva 1.2 vísir eina samanumtøku av ymsum arbeiðsmarknaðarhagtølum. Tølini vísa millum annað, hvussu starvsfólkatalið og lønargjaldingarnar eru vaksnar seinastu árini. Starvsfólkatalið í búskapinum er vaksið á hvørjum ári síðan 2020. Í 2024 høvdu áleið 60% av starvsfólkunum høvuðsstarv innan tað privata, meðan sløk 40% starvaðust innan almenna fyrisiting og tænastu. Á talvuni sæst, at tað serliga er útlendska arbeiðsmegin, ið hevur givið íkast til vøksturin í starvsfólkatalinum, og at talið av starvsfólkum, sum hava ein annan ríkisborgaraskap enn danskan, er vaksið serstakliga nógv síðani Fast Track skipanin fyri triðjalond var sett í gildi í november 2021.

Lønargjaldingarnar eru vaksnar munandi seinastu árini, sí talvu 1.2. Orsøkin kann vera hækkingar í tímalønini og hækkandi tal av starvsfólkum. Hækkandi lønargjaldingarnar kunnu eisini verða eitt tekin um, at starvsfólk arbeiða fleiri tímar. Eitt nú kann hækkaða kostnaðarstøðið hava ført við sær, at fólk eru farin at arbeiða fleiri tímar, ella átaka sær fleiri størv.

**Talva 1.2: Arbeiðsmarknaðarhagtøl**
Jul. 2020 til jun. 2024

| Miðal starvsfólkatal seinasta árið (juli til juni) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** |
| Samlaði búskapurin | 27.702 | 28.250 | 28.883 | 29.280 | 29.460 |
| -Feløg, húsarhald og felagsskapir | 17.314 | 17.544 | 17.950 | 18.178 | 18.199 |
| -Almenn fyrisiting og tænasta | 10.387 | 10.706 | 10.934 | 11.102 | 11.261 |
| Starvsfólk har ríkisborgaraskapur er annar enn danskur | 1.317 | 1.394 | 1.640 | 1.991 | 2.176 |
| Samlaði búskapurin (árlig broyting í %) | | 2% | 2% | 1% | 1% |
| Starvsfólk har ríkisborgaraskapur er annar enn danskur (árlig broyting í %) | | 6% | 18% | 21% | 9% |

| Útgoldin løn fyri juni (12 mánaðar samanlegging) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** |
| Samlaði búskapurin (mió. kr.) | 10.337 | 10.568 | 11.119 | 11.763 | 12.444 |
| - Feløg, húsarhald og felagsskapir (mió. kr.) | 6.778 | 6.748 | 7.141 | 7.664 | 7.997 |
| - Almenn fyrisiting og tænasta (mió. kr.) | 3.559 | 3.821 | 3.978 | 4.099 | 4.447 |
| Samlaði búskapurin (árlig broyting í %) | | 2% | 5% | 6% | 6% |
| Feløg, húsarhald og felagsskapir (árlig broyting í %) | | 0% | 6% | 7% | 4% |
| Almenn fyrisiting og tænasta (árlig broyting í %) | | 7% | 4% | 3% | 9% |

| Arbeiðsloysi | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** |
| Arbeiðsleys í % í juni | 1,8 | 1,2 | 0,7 | 0,6 | 1,0 |
| Arbeiðsleys í % 12 mánaðar miðal (juli til juni) | 1,2 | 1,5 | 0,9 | 0,7 | 0,9 |

**Viðm**: Samlaði búskapurin svarar til tað sum Hagstova Føroyar kallar inndendis búskapurin. Starvsfólktalið fyri innlendska búskapin samsvarar ikki við samlaða starvsfólkatalið, grundin er at samlaða starvsfólkatalið tekur 'umheimin og ógreinað' við eisini. í 2024 vóru um 70 starvsfólk í bólkinum 'umheimur og ógreinað'. 'Feløg, húsarhald og felagsskapir' er vinnufyritøkur (S11), fíggjarfyritøkur (S12), húsarhald (S14) og feløg (S15), meðan 'almenn fyrisiting og tænasta' er S13 í tjóðarroknskapinum.
**Kelda:** Hagstova Føroya og egnar útrokningar

## Trot á arbeiðsmegi

Ein avbjóðing fyri framhaldandi vøkstri í føroyska búskapinum er trot á arbeiðsmegi. Búskaparráðið metti í 2021, at starvsfólkatrotið frá 2020 til 2030 í almenna geiranum fór at tátta í 2.000 fólk innan eldrarøkt, heilsu- og almannaverk; umleið 1.300 vegna demografisku gongdina, og nærum 700 vegna tað, at starvsfólk, ið starvast á hesum økjum, væntast at fara á pensjón innan 2030[5]. Greining hjá Vinnuhúsinum vísir, at privati vinnugeirin hevur tørv á 270-350 fleiri starvsfólkum í løtuni. Harumframt metir vinnan, at tey koma at mangla áleið 700-850 starvsfólk tilsamans um fimm ár[6]. Vinnuhúsið vísir á, at tað í løtuni serliga er tørvur á faklærdari arbeiðsmegi og starvsfólkum við KT-førleikum.

Sambært Kommunufelagnum eru starvsfólk á eldra- og dagstovnaøkinum farin at arbeiða meira (tey taka eyka vaktir ella arbeiða meira í vikuskiftunum), og tí er starvsfólkatrotið á hesum økinum í løtuni minkað eitt vet. Eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi er tó framvegis stórur og arbeiði er til allar hendur, og trotið á arbeiðsmegi fer at veksa mong ár fram orsakað av demografisku gongdini. Búskaparráðið metir tað tí vera neyðugt, at politiska skipanin fremur nýskipanir, sum økja um arbeiðsútboðið hjá føroyingum.

Vinnutíttleikin er høgur í Føroyum samanborið við onnur lond í vesturheiminum, ið merkir, at luttøkan á arbeiðsmarknaðinum er stór. Tó vísa hesi hagtøl bert, at fólk arbeiða, og ikki hvussu nógv. Enn finnast ikki føroysk hagtøl, sum vísa, hvussu nógvir tímar fólk arbeiða um vikuna. Tí er torført at siga nakað um, hvat kann økja um samlaðu arbeiðstímarnar hjá arbeiðsfjøldini. Tó vita vit, at serliga størvini í vinnugreinum har flest kvinnur arbeiða (serliga á vælferðarøkinum), ikki eru fulltíðarstørv. Tað er harumframt innan hesar starvsfólkabólkar, at metta starvsfólkatrotið er størst. Politiska skipanin hevur umrøtt ætlanir um at stytta arbeiðsvikuna, ið er eitt átak, sum sannlíkt minkar um arbeiðsútboðið. Hvussu

[5] Temafrágreiðing, Starvsfólk á vælferðarøkinum komandi 10 árini, Búskaparráðið, 2021
[6] Starvsfólkatørvurin í privatu vinnuni, Vinnuhúsið, August 2024

ein stytting av arbeiðsvikuni ávirkar arbeiðsútboðið samlað sæð, eigur at vera greinað nærri, áðrenn ein slík broyting verður framd. Um arbeiðsútboðið lækkar nógv orsakað av styttu arbeiðsvikuni, kann tað gerast torførari at veita somu vælferðartænastur í framtíðini, sum vit hava í dag, tá talið av fólki, ið tørva hesa vælferðartænastur fer at veksa. Í síðsta enda er avleiðingin av varandi starvsfólkatroti, at framleiðslan í landinum, og harvið vælferðin, verður minni, enn hon kundi verið.

## Útlendsk arbeiðsmegi

Ein annar leistur at økja um arbeiðsfjøldina í Føroyum er við at fáa útlendingar til Føroya at arbeiða. Kappingin millum lond um arbeiðsmegina er hørð, tí broytingarnar í aldurssamansetingini hjá búfjøldini er eitt altjóða fyribrigdi og nógv lond í vesturheiminum hava somu avbjóðingar í framtíðini, sum Føroyar. Tí verður kappingin um arbeiðsmegina størri í framtíðini. Politiskt eigur eisini at vera arbeitt við, at útlendska arbeiðsmegin, sum kemur til Føroyar, nøktar ein tørv, ið er so virðisskapandi sum gjørligt fyri føroyska búskapin.

Í hagtølunum fyri løntakarar sæst, at tað hevur verið ein støðug tilgongd av útlendskari arbeiðsmegi seinastu mongu árini. Fleiri av starvsfólkunum, sum koma til Føroya umvegis sokallaðu Fast Track skipanina fyri triðjalond, arbeiða á fiska- og kryvjivirkjum. Sum víst til í várfrágreiðingini 2024, er lutfallið av útlendskum starvsfólkum innan fiski- og krivjivirkir vaksið nógv tey seinastu árini. Í juli 2024 vórðu 32% av starvsfólkunum innan fiski- og kryvjivirkir ikki danskir ríkisborgarar.

Øll, sum arbeiða í framleiðsluni á fiska- og kryvjivirkjum sleppa í fiskavirkisskipanina, tá eingin framleiðsla er vegna fiskaloysi. ALS lýsir í ársfrágreiðingini fyri 2023 fiskavirkisskipanina; hvussu hon riggar, og hvørjar skeiklandi avleiðingar hon kann hava fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Fiskavirkisskipanin er ein samhaldsføst skipan, tó víkir hon frá arbeiðsloysisskipanini, við at fiskavirkini og starvsfólkini á virkjunum sjálv fíggja ein part av útgjøldunum. Inngjøld frá fiskavirkjunum og starvsfólkunum á hesum virkjum fíggjaðu í 2023 áleið 50% av samlaðu útgjøldunum úr skipanini. Skuldu hesi fíggja alla skipanina sjálvi, hevði ALS-gjaldið hjá ávikavist arbeiðsgevara og løntakara verið 1,9% og ikki einans 1% í 2023. Hin helvtin varð eins og arbeiðsloysisskipanin fíggjað av øllum arbeiðsgevarum og løntakarum, ið eru millum 16 og 67 ár í Føroyum[7].

Goldin arbeiðsloysisstuðul úr fiskavirkisskipanini er vaksin nógv tey seinastu árini, frá sløkum 15 mió. kr. í 2019 til 26 mió. kr. í 2023. Talið av tryggingartímum[8] er somuleiðis hækkað hetta tíðarskeiðið; eitt nú kann nevnast, at talið av tryggingartímum er vaksið sløk 78% frá 2019 til 2023.

Í 2023 vóru 1.534 fólk í fiskavirkisskipanini, av hesum vóru sløk 40% útlendingar og næstan 70% av hesum vóru í Føroyum við einum tíðaravmarkaðum arbeiðsloyvi. Teir 401 útlendingarnir við tíðaravmarkaðum arbeiðsloyvi fingu í 2023 útgoldið 5,1 mió. kr. (harafturat koma eftirlønir og arbeiðsmarknaðargjøld) úr fiskavirkisskipanini, ið er sløk 20% av samlaðu útgjøldunum úr fiskavirkisskipanini. Sambært ALS tvífaldaðust útgjøldini til útlendingar við tíðaravmarkaðum arbeiðsloyvi í 2023.

Í ársfrágreiðingini fyri 2023 skrivar ALS millum annað soleiðis: *"Tað eru eisini dømi um útlendingar, sum lítið og einki hava arbeitt seinasta hálvtannað árið, har arbeiðsloysisstuðulin í veruleikanum er grundarlagið undir uppihaldinum í Føroyum."*

Búskaparráðið er av tí áskoðan, at útlendsk arbeiðsmegi ikki eigur at verða innflutt til vinnur, sum ikki kunnu bjóða starvsfólkunum kravda tímatalið, sum er grundarlagi fyri teirra arbeiðs- og upphaldsloyvi. Harumframt eiga samhaldsfastar skipanir sum fiskavirkisskipanin, ið allir løntakarar og arbeiðsgevarar í Føroyum eru við til at fíggja, ikki at vera nýttar til at tryggja, at arbeiðsgevarar kunnu lúka arbeiðskravið á 40 tímar um vikuna.

[7] Ársfrágreiðing 2023, ALS.
[8] Tryggingartímar er talið av tímum, ALS hevur rindað arbeiðsloysisstuðul fyri.

Tað er ikki skynsamur vinnupolitikkur, og tað darvar búskaparmenningini í Føroyum, at hava skipanir sum fiskavirkisskipanina, sum eggjar starvsfólk at vera í eini vinnu, sum ikki sjálv kann bjóða starvsfólkunum fulltíðararbeiðið alt árið. Fiskavirkisskipanin er skeiklandi fyri arbeiðsmarknaðin á tann hátt, at skipanin minkar um tilskundanina hjá arbeiðismegini at flyta seg til tey arbeiðsøki og tær vinnur, ið tørva arbeiðsmegi, tá ið fiskavirkini ikki megna at bjóða starvsfólkunum kravdu arbeiðstímarnar. Hetta tí starvsfólkini fáa løn úr fiskavirkisskipaninini, tá einki er at gera á virkjunum. Sostatt kann fiskavirkisskipanin verða ein forðing fyri, at hendan arbeiðsmegin leitar sær til vinnur, har hon hevði givið størri íkast til búskapin og virðiskipanina í Føroyum.

### Hækkan av pensjónsaldri

Eitt átak, ið økir um arbeiðsútboðið, er at hækka pensjónsaldurin. Búskaparráðið mælti í frágreiðingini um fíggjarpolitiskt haldføri frá januar 2024 at hækka pensjónsaldurin fyri at fáa haldføri í búskapin. Eitt nú vísti greiningin avleiðingarnar av at hækka pensjónsaldurin við einum árið fimta hvørt ár. Hetta hevði betrað um lutfallið millum tey sum eru á arbeiðsmarknaðinum og tey sum eru uttanfyri arbeiðsmarknaðin í longdini. Pensjónsaldurin eigur í minsta lagið at fylgt eini indeksering, ið merkir, at pensjónsaldurin hækkar so hvørt, sum restlivitíðin hjá pensjónistum hækkar. Restlivitíðin hjá fólki, ið hava rokkið pensjónsaldur, er tó longu hækkað við 4 árum síðani 1988, uttan at pensjónsaldurin er øktur tilsvarandi, og vit eru sum nú er afturúr við at hækka pensjónsaldurin. Neyðugt er tí at seta ferðina upp á javningini á áramálunum í ávikavist arbeiðs- og pensjónslívinum fyri at fáa haldføri í fíggjarpolitikkin. Tá ið pensjónsaldurin ikki hækkar samstundis sum liviárini gerast fleiri, førir tað til ein ójavnvág í lutfallinum millum hækkandi útreiðslur til pensjón og relativt færri skattainntøkur frá arbeiðsinntøkum í arbeiðslívinum. Neyðugt er tí at stilla pensjónsaldurin, so økti livialdurin ikki einans fer til fleiri ár á pensjón, men eisini til fleiri virkin ár á arbeiðsmarknaðinum. Neyðugt er at seta ferðina upp á javningini á áramálunum í ávikavist arbeiðs- og pensjónslívinum fyri at fáa haldføri í fíggjarpolitikkin.

## 2. Húsarhaldini

Privata nýtslan svarar áleið til helvtina av innlendis eftirspurninginum. Nýtslan hjá húsarhaldunum er millum annað tengd at teirra bjartskygni, ið verður lýst við vísitølum í konjunkturbarometrinum, sum er brúkarakanning Hagstovu Føroya. Í nýggjastu úrslitunum (juni 2024) skal havast í huga, at kanningin bleiv gjørd undir og beint eftir verkfallið, og tí kunnu svarini vera ávirkaði av hesum.

### Treysti

Vísitalið vísir millum annað, hvussu brúkarin metir búskaparstøðuna vera. Treystið hjá føroysku húsarhaldunum er hækkað eitt vet, sí mynd 2.1. Húsarhaldini eru við gott mót og síggja bjartari uppá fíggjarstøðuna í dag og komandi árið, enn tey gjørdu í januar 2024. Størsti parturin av húsarhaldunum (áleið 57%) spara nakað upp. Tey flestu hava fingið lønarhækkan og skattalætta seinasta árið og tí er líkt til, at tøka inntøkan og keypiorkan er økt. Tað, at inflatiónin er komin niður aftur á eitt lægri støði merkir, at prísvøkstur ikki longur í eins stóran mun, sum í 2022 og 2023, minkar um keypiorkuna. Samanumtikið viðvirkar hetta sannlíkt til, at fíggjarligu útlitini tykjast bjartari hjá húsarhaldunum.

**Mynd 2.1: Vísital – samlað brúkaravísital fyri føroysku húsarhaldini**
Jan. 2019 til jun. 2024




**Viðm.:** "Miðal" er miðal av mátingum frá 2006 til 2024.
**Kelda:** Hagstova Føroya

Sambært brúkarakanningini er talið av teimum, ið júst fáa endarnar at røkka saman, nærum óbroytt samanborið við seinastu kanning (frá 25% til 27%), ið helst stendst av, at flest øll hava eitt starv í dag. Húsarhaldini vænta, at teirra fíggjarstøða verður betri um eitt ár.

Húsarhaldini eru minni bjartskygd, tá tað kemur til føroysku búskaparstøðuna komandi ár, men eru tó ikki eins svartskygd, sum tey vóru í januar 2024. Kjakið í almenna rúminum hevur seinastu tíðina verið tengt at geopolitiskum óvissum (eitt nú fiskiveiðuavtalan við Russland), verkfall, undirskot á fíggjarlógini, og at føroyski fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur. Hetta kann ávirka, hvat fólk halda um búskaparstøðuna í Føroyum, hóast búskaparvøksturin seinastu árini hevur verið stórur, arbeiðsloysið søguliga lágt, og løntakaratalið methøgt.

## Nýtsla

Mynd 2.2 vísir smásøluvísutalið fyri handlar, sum selja ávíkavist mat-, drykkju- og tubbaksvørur, húsarhaldsútgerð, og klædnapløgg. Myndin vísir smásøluna í føstum prísum, ið merkir at uppgerðin er reinsað fyri prísvøkstur, og kann tí nýtast sum meting av nøgdini av seldum vørum. Á myndunum sæst, at smásølan av mati-, drykkju- og tubbaksvørum í føstum prísum, liggur støðug. Hóast høg inflatión hevur verið á matvørum o.ø. merkir tað, at hóast húsarhaldini brúka fleiri krónur, fáa tey minni fyri peningin, tá ið tey keypa mat- og drykkjuvørur. Handilsvinnan boðar frá, at nýtslumynstrið hjá brúkarunum er broytt; tey keypa í størri mun lágprísvørur og í minni mun eitt nú vistfrøðiligar vørur.

Á myndini sæst eisini, at sølan í handlum, sum selja klæðir, er fallin nógv síðan 2021, og tykist framvegis at fella. Sølan av húsarhaldsútgerð er fallin síðan 2021, men tykist at hava lagt seg á eitt javnt støðið seinasta árið.

**Mynd 2.2: Smásøluvísitøl, í føstum prísum**

1. ársfjórðing 2020 til 1. ársfjórðing 2024




**Kelda:** Hagstova Føroya

Kortnýtslan hjá føroysku húsarhaldunum higartil í 2024 líkist tí, sum hevur verið undanfarnu tvey árini, undantikið í juni mánað, har hon orsakað av verkfallinum var lægri, enn í juni mánað árini frammanundan, sí mynd 2.3.

**Mynd 2.3: Kortnýtsla hjá føroyingum í Føroyum og uttanlands samanlagt**
Jan. 2021 til jun. 2024




**Kelda**: Bank Nordik og Betri Banki. Hagtølini eru deflateraði við brúkaraprístalinum (egnar útrokningar).

## Bústaðarbyrða

Ein stórur partur av tøku inntøkuni hjá fólki fer til at gjalda bústaðarskuld. Tey, ið hava stóra sethúsaskuld og broytiliga rentu á lánunum, hava verið harðast rakt av stóru rentuhækkingunum. Rentuhækkingarnar hava síðani á sumri 2022 økt um bústaðarbyrðuna hjá sethúsaeigarum. Bústaðarbyrðan er parturin av tøku inntøkuni, sum fer til at gjalda bústaðarlán. Sethúsaprísurin og rentan hava nógv at siga fyri bústaðarbyrðuna. Tøl sum Betri Banki hevur uppgjørt vísa, at bústaðarbyrðan er hækkað kring landið, sí

mynd 2.2. Byrðan hækkar støðugt árini 2019-2023. Hon er farin úr 30% upp á 44% í Tórshavn, úr 18% til 26% í Klaksvík og úr 15% til 26% í Eysturoynni[9].

**Mynd 2.2: Bústaðarbyrðan í Tórshavn, Klaksvík og Eysturoy**
2019 - 2023




**Viðm.:** Bústaðarbyrðan er roknað fyri eitt par við tveimum børnum undir 7 ár, hvør persónur í parlagnum tjenar eina miðalløn, lánið er eitt annuitetslán á 25 ár, rentan er ein miðalrenta vektað eftir rentudøgum. Støddin á láninum svarar til miðalsethúsaprísin í økinum.
**Kelda:** Betri Banki.

Sethúsaprísirnir hava hildið støðið í Tórshavn í fyrru helvt av 2024 samanborið við sama tíðarskeið árið fyri (1% vøkstur), meðan teir eru hækkaðir við 13% í størru bygdunum, lækkaðir við 5% í smærri bygdunum og hækkaðir við 11% í Sandoy-Suðuroy. Talið av sølum hevur verið áleið tað sama fyrra hálvár 2024 sum í fyrra hálvári 2023, tá talan er um økir uttanfyri Tórshavn. Í Tórshavn hevur talið av sethúsasølum bert verið góð helvtin í fyrru hálvu av 2024 samanborið við sama tíðarskeið árið fyri. Hinvegin hevur talið av íbúðarsølum í Tórshavn verið nærum eins stórt í fyrru hálvu av 2024 sum í fyrru hálvu av 2023, og miðalprísurin á íbúðum er hækkaður 12% seinasta árið.

Meklarar greiða frá, at tey sum skulu keypa býli fyri fyrstu ferð hava torført at við at sleppa inn á sethúsamarknaðin, serliga í miðstaðarøkinum orsakað av rentuhækkingum og herdum krøvum til tiltøkupeningin. Eisini er byggitilfarið dýrkað nógv, ið ger, at fólk eru afturhaldin við at byggja nýtt. Tekin eru um, at fólk keypa smærri búeindir enn ætlað, ella leita sær útum miðstaðarøkið av somu orsøk, og tí er eftirspurningurin uttanfyri Tórshavn og eftir smærri búeindum mett at vera øktur.

Mangul á bústøðum er ein týðandi fløskuhálsur, sum er við til at forða fyri framhaldandi fólka- og búskaparvøkstri í Føroyum. Búskaparráðið metir tað vera umráðandi, at kommunur við stórum fólkavøkstri framskunda útstykkingar av grundstykkjum - serliga til bygging av íbúðum og øðrum smærri bústaðareindum, so bráfeingistørvurin skjótari verður nøktaður. Landið eigur somuleiðis at gera sítt íkast við at byggja leigubústaðir.

# 3. Vinnan

Vinnan er í høvuðspørtum deild í fýra bólkar. Teir eru 1) fiskivinna og tilfeingisvinna, 2) byggivinnan og tilvirking, 3) privatar tænastuvinnur og so 4) almennar tænastur, ið fevnir um land, kommunur og ríkisstovnar v.m.[10]

[9] Fíggjarligt støðufesti ársfrágreiðing 2023, Landsbanki Føroya

[10] Fiskivinna o.o. tilfeingisvinna fevnir um: Landbúnaður, Fiskiskapur, Ali- og kryvjivirki, Ráevnisvinna, Fiskavøruídnaður og Ótilskilað v.m., Byggivinna o.o. tilvirking fevnir um: Skipasmiðjur, smiðjur, Annar ídnaður, Bygging og Orku- og vatnveiting, Privatar tænastuvinnur fevnir um: Handil og umvæling, Gistihús og matstovuvirki, Sjóflutningur, Flutningur annars, Postur og fjarskifti, Fígging og trygging, Vinnuligar tænastur, Húshaldstænastur og Felagsskapir, mentan o.a., Almenn o.o. tænasta fevnir um: Almenn fyrisiting v.m.: Landsfyrisiting, Kommunur og ríkisstovnar, Undirvísing og Heilsu- og almannaverk

Mynd 3.1 vísir samlaða vísitalið í føroyska búskapinum hjá bæði brúkarum og vinnu. Treystitalið er lækkað úr -1 í januar 2024 til -5 í juni 2024. Í høvuðsheitum er tað treystið í tilfeingis- og ídnaðarvinnum, sum er fallið. Vektirnar í treystitalinum eru settar eftir somu mannagongdum, sum aðrir hagtalsgrunnar nýta t.d. eurostat, tó so at í Føroyum er tilfeingisvinnan løgd aftrat ídnaðinum, tí vinnan hevur stóran týdning fyri føroyska búskapin. Nýggjasta kanningin bleiv, sum áður greitt frá, framd í mai og juni undir drúgva verkfallinum, og tí skal havast í huga, at svarini í kanningini kunnu vera ávirkaði av verkfallinum.

**Mynd 3.1: Treystitalið fyri brúkarar og vinnuna**
Jan. 20 til jun. 24




**Viðm.:** "Miðal" er miðal av mátingum frá 2006 til 2024. Samanvigaður ávísi frá 5 kanningum fyri brúkarar og 4 vinnubólkar. Brúkarar 20%, tilfeingisvinnur o.a. ídnaður 40%, byggivinnan 5%, handilsvinnan 5% og tænastuvinnur 30%.
**Kelda:** Hagstova Føroya

## Byggivinnan

Byggivinnan sveiggjar vanliga við konjunkturunum. Treystið í byggivinnuni er sambært konjunturbarometrinum gott. Vísitalið er 31 í juni 2024, ið er lægri enn í januar (51), men framvegis positivt. Fleiri stórar verkætlanir eru í gongd og byggivinnan hevur í miðal ordrabøkurnar fullar eitt ár fram, ið er áleið tað sama, sum í januar. Onnur hvør byggifyritøka boðar frá, at trot á arbeiðsmegi er største forðingin í framleiðsluni, meðan ein triðingur boðar frá, at fíggjarligar avmarkingar er ein forðing í framleiðsluni, sum møguliga kann koma av, at dagførdar reglur hjá Fíggjareftirlitinum í sambandi við fígging av leigubústøðum eru herdar. Lønsemið sær gott út í vinnuni og vinnan boðar frá, at tað stendur væl til at fáa góðan prís fyri verkætlanirnar hjá teimum.

Metingar fyri verandi og væntaðar íløgur benda á, at eftirspurningurin hjá byggivinnuni framvegis er stórur. Nakrar av teimum størri almennu og kommunalu verkætlanunum verða væntandi lidnar í ár, tó tykist eftirspurningurin hjá almenna geiranum framvegis at verða stórur í 2025. Harumframt veksa privatu íløgurnar væntandi í 2025.

Búskaparráðið hevur áður gjørt vart við, at tað er óheppið at tað almenna, tað vil siga land og kommunur, leggja óneyðugt trýst á byggivinnuna við at seta stórar byggiverkætlanir í gongd í góðum tíðum, samstundis sum tað privata ger stórar íløgur. Hetta tí eftirspurningurin hjá tí almenna økir uppaftur meira um eftirspurningin eftir arbeiðsmegi í byggivinnuni, sum kann elva til lønartrýst í byggivinnuni, og harvið dýrkar byggiverkætlanirnar hjá bæði tí almenna og privata.

## Privata tænastuvinnan

Privata tænastuvinnan fevnir um handil og umvæling, gistihús og matstovuvirki, sjóflutningur, flutningur annars, postur og fjarskifti, fígging og trygging, vinnuligar tænastur, húshaldstænastur og felagsskapir, mentan o.a.

### Handilsvinnan

Smásøluvísitalið vísir at sølan av húsarhaldsútgerð og mati v.m. so at siga stendur í stað í føstum prísum og at sølan av klædnapløggum kvinkar enn eitt sindur niðureftir, ið helst merkir, at vit brúka størri part av tiltøkupeninginum til mat.
Handilsvinnan er ein týðandi partur av privatu tænastuvinnuni. Í nýggjasta konjunkturbarometrinum hjá hagstovu Føroya letur vinnan nógv betri at samanborið við januar 2024. Ávísin hjá handilsvinnuni í nýggjastu kanningini frá juni 2024 er 4 (í mun til -27 í januar). Handilsvinnan boðar frá, at goymslan er eitt sindur lægri enn í vetur, og hon væntar samstundis meira sølu í 2024. Handilsvinnan væntar tó ikki, at hava tørv á fleiri starvsfólki, enn áður. Nýtslumynstrið hjá brúkarunum er broytt og fólk eru farin yvir til at keypa bíligari vørur, heldur enn eitt nú dýrar merkjavørur. Sambært bilasølunum er eftirspurningurin eftir nýggjum bilum fallin, og brúkararnir eru í størri mun farnir at keypa brúktar bilar.

### Tænastuvinnan

Ávísin hjá privatu tænastuvinnuni stendur í stað í nýggjastu kanningini hjá Hagstovu Føroya samnborið við januar í ár og liggur á einum lutfalsligum lágum støði. Privata tænastuvinnan hevur verið hart rakt av verkfallinum í mai – juni, og tað hevur helst ávirkað svarini í kanningini til konjunkurbarometrið. Tænastuvinnan svarar í kanningini, at sølan seinasta árið hevur ikki verið nøktandi, men samanborið við svarini í kanningini í vetur, hevur eftirspurningurin og arbeiðstørvurin verið hægri, og tænastuvinnan væntar eisini hægri eftirspurning og arbeiðstørv komandi tíðina.

Í tænastuvinnuni er tað serliga flutningsfyritøkur, ið fylla nógv og tær vóru allar hart raktar av verkfallinum. Verkfallið hevði eisini ávirkan á byrjanina á háárstíðina hjá ferðavinnuni og nógvar avlýsingar vóru. Sambært Visit Faroe Islands tykjast altjóða útlitini fyri ferðavinnuna bjørt og væntaninar í verandi støðu fyri er ein árligur vøkstur á 4,5-5,2% fram til 2030. Hotellini í Føroyum vænta ein lítlan vøkstur í gistingum komandi árið.

## Tilfeingisvinnur

Tilfeingisvinnan kann í høvuðsheitum býtast sundur í teir 3 bólkarnir, sum snúgva seg um hvør sítt virksemi. Bólkarnir eru uppsjóvarvinnan, ið fiskar makrel, sild og svartkjaft, ið virkar undir einari kvotaskipan. Síðani er tað botnfiskurin, sum virkar partvís undir einari fiskidagaskipan í føroyskum sjógvi og undir kvotuskipanum aðrastaðnis, td. í Barentshavinum, Ísland, Bretlandi, Grønlandi og Flemish Cap. So er tað alivinnan, ið leggur sítt virksemi til rættis eftir egnum treytum.

Av tí at ymiskar orsøkir ávirka vinnurnar á hvør sín hátt, eru tað fleiri orsøkir til, at ávísin fyri tilfeingisvinnuna og annan ídnað er lækkaður eitt vet síðani seinastu konjunkturkanning. Vísitalið er farið úr -19 niður í -33. Uppsjóvarvinnan boðar millum annað frá eini væl lægri kvotu av makreli, sum kemur av nýggju strandarlandaavtaluni. Men avtalan ger at fiskiskapur eftir makreli eisini kann vera í norskum og bretsum øki, tá makrelurin er betri fyri, og gevur betri prís. Kvotan av sild fellur eisini. Botnfiskavinnan boðar frá einari minkandi kvotu av toski í Barentshavinum, men góðum hýsu- og upsafiskiskapi undir Føroyum. Fiskaprísirnir eru á einum góðum støði og væntast møguliga at hækka í ár. Stígur væntast harafturat í altjóða útboðnum av laksi, ið helst merkir at laksaprísurin hækkar í longdini; tó hevur tað víst seg, at laksaprísurin hevur verið lægri í summar, samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Útflutningurin av laksi væntast at hækka eini 14% í nøgd í ár.

### Uppsjóvarvinnan

Nýggj strandarlandaavtala millum Føroyar, Noreg og Stórabretland um makrelin kom í lag í juni 2024, sum merkir, at føroyska kvotan lækkar 48% í 2024 samanborið við kvotuna fyri 2023. Føroyska kvotan verður komandi trý árini 12% av heildarkvotuni. Eingin strandarlandaavtala hevur verið síðstu árini og tí hava londini sett sína egnu makrelkvotu og setti m.a. Føroyar sína egnu kvotu á 19,6%. Samlaða kvotan, sum hevur verið fiskað hevur verið langt omanfyri TAC, sum ICES hevur tilmælt. Nú strandarlondini Noreg, Stórabretland og Føroyar hava gjørt avtalu, verður fiskað nakað nærri tilmælinum hjá ICES. Ovveiðan av makreli var umleið 40% í 2023 og fer niður á umleið 30% við nýggju avtaluni.

ICES mælti til at lækka heildarkvotuna 5% í 2024 og fylgdu londini hesum niðurskurði. Ovveiðan hevur higartil borið til, tí tilgongdin av makreli hevur verið góð, men hetta er ikki haldgott í longdini, tí nýggjastu stovnsmetingarnar siga, at stovnsstøddin er fallandi.

Heildarkvotan fall eitt vet í fjør, og hon fellur somuleiðis í ár, og má eisini væntast at fella næsta ár. Nógvar avbjóðingar og nýggir møguleikar eru í løtuni við nýggju avtaluni, tí nú kann makrelurin fiskast, tá hann hevur betri góðsku (í norskum sjóøki 40% av heildarkvotuni og bretskum sjóøki 35% av heildarkvotuni), ið merkir, at hann kann seljast fyri betri prís og tað eisini er møguligt at selja til aðrar marknaðir. Ein annar fyrimunur við at fiska í bretskum sjógvi er, at har er effektivari at fiska, tí makrelurin meira er samlaður í torvur, ið merkir sparingar í oljuútreiðslum og tíð.

Higartil hevur Russland verið høvuðsmarknaðurin hjá føroysku útflytarunum av makreli. Russiski marknaðurin hevur goldið væl fyri makrelin, men geopolitiskur ófriður valdar og tað ger russiska marknaðin ótryggan.

Talva 3.1 vísir avleiðingarnar av makrelavtaluni frá juni 2024 í nøgd og virðum. Ein avleiðing afturat er, at landskassin væntandi missur umleið 74 mió. kr. í veiðigjøldum fyri makrelin samanborið við fíggjarætlanina fyri 2024.

**Talva 3.1 Avleiðingar av makrelavtalu 2024**

| | Nøgd tTons | Virði mió. kr. | Prísur kr/kg |
|---|---|---|---|
| Fiskiskapur 2023 | 173 | 1.153 | 6,67 |
| Væntaður fiskiskapur 2024 | 69 | 670 | 9,78 |
| Fiskiskapur 2024 Uttan avtalu (mett) | 120 | 799 | 6,67 |
| Munur við avtalu | -51 | -129 | 3,11 |
| | | | |
| Veiðigjøld 2023 | | 251 | |
| Veiðigjøld mett 2024 | | 99 | |
| Veiðigjøld u/avtalu 2024 | | 174 | |
| Missur við avtalu í 2024 | | 74 | |

**Kelda:** Vørn og egnar metingar.

Strandarlandaavtalan inniber harafturat, at allur makrelur, sum verður fiskaður í norskum sjógvi (upp til umleið 40% av føroysku kvotuni) skal um norska uppboðssølu. Noreg hevur betri og fleiri handilsavtalur enn Føroyar eystureftir og kunnu tí bjóða høgan prís fyri makrel. Um ein partur av tí, sum verður fiskað í norskum sjógvi, verður landað í Noreg, merkir tað alt annað líka, at virksemið í Føroyum verður minni. Óvist er tó hvussu nógv fer at vera fiska í norskum sjógvi

Svartkjaftastovnurin vísur seg at sveiggja nógv og tveir serstakliga stórir árgangir av svartkjafti hava ført við sær, at kvotan vaks við heili 81% í 2023, og aftur 12,5% í 2024. Í 2025 væntast, at heildarkvotan fyri svartkjaft verður áleið óbroytt. Føroyska kvotan hækkaði 14% í 2024 eftir umbýti við eitt nú Russland. Eingin strandarlandaavtala er um svartkjaftin, og ovveiðan er mett at vera 34%. Nærum eingin svartkjaftur verður útfluttur til matna, tí hann verður virkaður á landi til mjøl og fóður, serliga til alivinnuna. Av tí at svartkjaftakvotan er so mikið stór, og nøgdin av svartkjafti til matna helst ikki veksur, var nógvur svartkjaftur landaður uttanlands. Í 2023 vórðu 120.000 tons av svartkjafti landaði uttanlands, og higartil í ár eru 132.000 tons landað uttanlands, ið svarar til 38% av veiðuni.

Støðan hjá norðhavssildini er ring, og tískil mælti ICES til at lækka heildarkvotuna 15% í 2023 og aftur 24% í 2024 orsakað av vánaligari tilgongd. Eingin strandarlandaavtala er um norðhavssildina í løtuni, og tað hevur ført til ovveiðu á 35% seinnu árini. Í 2023 ásetti Føroyar sær sjálvum eina kvotu á 22% av heildarkvotuni. Føroyar hava inntil víðari ásett sær eina fyribilskvotu á 10% í 2024, og møguliga verður hendan kvotan hækka seinni í ár. Sildakvotan fyri 2024 í talvu 3.2 er fyribilskvotan, tí sær lækkingin so ógvuslig út.

Kanningar og fiskiskapur vísa, at sildin er við at broyta ferðamynstur og flytur seg longur norðureftir. Hetta kann gera at minni sild verður í føroyskum sjógvi frameftir. Tí er neyðugt við avtalum við grannalondini um ikki alt skal fiskast í altjóða sjógvi. Higartil hava føroysk skip kunnað fiska sild í

íslendskum sjógvi í býti við at íslendarar fiska svartkjaft í føroyskum sjógvi og hevur tað gjørt tað møguligt at fiska alla sildakvotuna.

**Talva 3.2: Uppsjóvarkvotur eftir umbýti við onnur lond**

| | Makrelur | Svartkjaftur | Sild |
|---|---|---|---|
| 2023 | 132.385 | 392.542 | 100.313 |
| 2024 | 68.535 | 447.868 | 28.015 |
| % broyting frá '23-'24 | -48% | 14% | -72% |

**Viðm:** sildakvotan í 2024 er ikki endaliga ásett, men er bert ein fyribilskvota.
**Kelda:** Felagið Nótaskip

Talvan omanfyri vísur føroysku uppsjóvarkvoturnar í 2023 og 2024. Fyri 2023 var fiskiskapurin eftir makrel góð 40 tTons meira enn talva 3.2 vísir (sí talvu 3.1), tí skipini fiskaðu kvotur frá undanfarnum árum.

Árið 2023 var eisini serstakt, av tí at lýsi- og fiskamjølprísir vóru methøgir. Tað førdi við sær, at nógvur makrelur, sum vanliga verður landaður hjá uppsjóvarvirkjunum, ístaðin bleiv landaður sum ídnaðarfiskur til Havsbrún ella uttanlands. Tað vil siga, at útflutningurin av ídnaðarfiski, fiskamjøli og lýsi vaks, meðan útflutningurin av makreli til matna fall eitt vet. Høgi lýsi- og fiskamjølprísurin í 2023 skyldast veðurfyribrigdinum El Niño, ið hevði við sær, at Peru, sum er heimsins størsti útflytari av fiskamjøli, onga kvotur hevði, og tí hækkaði heimsprísurin orsakað av minni útboði. El Niño fyribrigdið hasar nú av og makrelurin, sum verður fiskaður í ár, hevur ov góða góðsku til at verða virkaður til ídnaðarfisk. Tí væntast útflutningurin av lýsi at lækka 94% í ár. Høgi prísurin á lýsi helt støðið undir landingarprísinum á makreli í 2023.

## Botnfiskur

Fiskiskapurin eftir toski, hýsu og upsa á landgrunninum verður skipaður við fiskidøgum, umframt øðrum átøkum. Bólkur 2 (lemma- og partrolarar) verður skipaður fyri seg, serliga grundað á stovnsmetingarnar fyri upsa, meðan bólkur 3-5 (lína, snella og trolbátar) verða skipaðir saman, grundað á stovnsmetingar fyri tosk og hýsu. Onnur botnfiskasløg undir Føroyum, eitt nú longa, brosma og svartkalvi verða ikki stýrd eftir nakrari skipan.

Gongdin í fiskiskapinum av høvuðsbotnfiskasløgunum toski, hýsu og upsa undir Føroyum, hevur verið niðurgangandi í fleiri ár. Toskastovnurin á landgrunninum er sera illa fyri og mælti ICES til onga veiðu eftir toski á landgrunninum í 2023 og 2024. Stovnurin hevur verið undir søguligum lágmarki síðan 2004, undantikið í 2018. Av tí at toskastovnurin er undir lívfrøðiliga vandamarkinum, mælti Havstovan í fjør til, at hugt var burtur frá umsitingarætlanini og at fiskidagarnir hjá Bólki 3-5 skuldi skerjast 20%, hóast hýsustovnurin er í vøkstri.

Veiðan av upsa hevur verið undir søguliga miðal síðan 2010. Havstovan metti í fjør, at upsastovnurin var toluliga væl fyri. Havstovan mælti til, at fiskidagarnir til Bólk 2 verða skerdir 10%. Orsøkin til tilmæli at skerja fiskidagarnar við10%, var at hesin bólkur fiskar tosk sum hjáveiðu, og toskastovnurin er avbera illa fyri. Umframt at veiðan av toski undir Føroyum væntandi fellur í 2024, fellur kvotan í Barentshavinum eisini. Ein lækking í kvotuni í Barentshavinum er eisini í væntu í 2025. Kvotan á Flemish Cap er hækkað seinastu tíðina, tó mælir NAFO til at minka toskakvotuna á Flemish Cap í 2025. Í síni heild verður mett, at útflutningurin av toski í nøgd fellur komandi tvey árini. Av tí at toskakvotan í Barentshavinum fellur og at nýggju flakatrolararnir eisini eru útgjørdir til at fiska rækjur, verður helst meira av rækjum fiskað í 2024 og 2025 enn undanfarin ár.

## Alivinnan

Tøkan av alilaksi hevur gingist væl í ár og er mett at gerast upp móti 154% størri í 2024, enn hon var í 2023. Goymslurnar eru á leið 5% størri í 2024 samanborið við 2023 og fellið er eitt sindur hægri. Hesar báðar effektirnar mestsum útjavna hvørja aðra. Tøkunøgdin í 2025 er verri at spáa um og kvinkar møguliga eitt lítið vet uppeftir.

Útlitini í alivinnuni eru góð. Tó var ILA staðfest í tveimum aliringum í Suðuroy í mai, men tað sær út til at tilbúgvingin, sum var sett í verk, tá ið sjúkan varð staðfest, virkaði sum ætlað, og smittan spjaddi seg ikki víðari til annað virksemi.

**Mynd 3.2: Tøka (livandi vekt) í alivinnuni**
2019 til 2025




**Viðm.:** 2024 og 2025 eru metingar
**Kelda:** Avrik sp/f.

Smoltgoymslan á landi bendir á, at tøkunøgdin kann gerast størri í 2025, enn í 2024. Eftir 2025 verður smoltframleiðslan á landi økt, sum merkir, at meira av framleiðsluni kann gerast á landi, ið sostatt styttir um tíðina laksurin er í sjónum, ið vil økja um samlaðu framleiðsluna.

Føroyar hava ein kappingarfyrimun, tá ið tað kemur til framleiðslu av laksi í sjónum, eitt nú tí hitin í sjónum er optimalur fyri laksaframleiðslu. Avmarkingin fyri alingina á sjónum er at alifirðirnir gerast ikki fleiri, sum merkir, at skal úrtøkan økjast, má alifiskurin verða longri á landi, soleiðis at útskiftingin á sjónum verður títtari.

Laksaprísurin var serliga høgur fyrra hálvár 2023 og lækkaði aftur í seinnu helvt av 2023. Sambært metingarstovninum Fishpool hevur laksaprísurin verið eitt vet lægri í ár samanborið við í fjør, og væntast at liggja á leið á sama høga støðinum sum í fjør. Metingin í várfrágreiðingin bygdi á eina meting, um at heimsprísurin fór at veksa áleið 6% í 2024, grundin var at altjóða útboðið av alilaksi væntandi ikki veksur 2024 og 2025. Tað hevur tó víst seg, at prísurin er ikki vaksin eins nógv sum væntað, hóast eftirspurningurin er vaksin.

# 4. Handil og útflutningur

## Handilsjavni

Myndin niðanfyri vísir gongdina í handilsjavnanum av vørum sum leypandi 12-mánaðar samanlegging. Handilsjavnin er útflutningurin av vørum minus innflutningin av vørum, við øðrum orðum uttanlandshandil av vørum. Handilsjavnin var 1,5 mia. kr. í juni 2024, meðan hann uttan skip og flogfør var 2,3 mia. kr.

Í 2023 minkaði útflutningsvirðið nakað av botnfiski og alifiski, meðan økti útflutningurin av svartkjafti sum fiskaúrdráttur vaks munandi í bæði nøgd og virði. Prísirnir á fiskamjøli, fóðri og serliga lýsi, vóru hinvegin høgir alt 2023, og fyrstu mánaðirnar av 2024.

Útlitini fyri útflutningin í 2024 er millum annað merkt av øktari svartkjaftakvotu og høgum laksaprísum. Útflutningurin av sild, makreli og toski fellur væntandi vegna fallandi kvotum. Størsta broytingin í metingunum fyri 2024 samanborið við 2023 er, at útflutningurin av mjøli og lýsi væntandi fellur, tí makrelur verður framleiddur til matna, heldur enn at verða landaður sum ídnaðarfiskur.

**Mynd 4.1: Handilsjavnin**
Jan. 21 til jun. 24




**Viðm.:** Leypandi 12-mánaðar samanlegging
**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í útflutningstølum hjá Hagstovuni

Fyrra hálvár í ár er innflutningsvirði minkað góð 14%, ið svarar til eina minking á 852 milliónir krónur. Minkingin var góð 12% áðrenn verkfallið byrjaði, tí er tað er ikki verkfallið, sum drívur minkingina, men í høvuðsheitum bíligari innflutningsvirði á brennievni og ein lækking av innfluttum skipum.

## Vøruútflutningur

Myndin niðanfyri lýsir gongdina seinastu fýra árini í útflutningsvirðinum av fiskavørum fyri høvuðsbólkarnar alifiskur, uppsjóvarfiskur, botnfiskur, fiskamjøl, fóður og lýsi. Onnur fiskasløg, eitt nú lodna, longa og rækjur v.m. eru ikki við í myndini. Í juni 2024 høvdu onnur fiskasløg eitt virðið á eina góða milliard sum 12 mánaðar samanlegging.

Útflutningurin av alifiski er næstan helmingurin av samlaða útflutningsvirðinum av vørum. Mynd 2.2 vísir, at útflutningurin í juni var góðar 5,8 mia. kr., ið er ein vøkstur á 5% samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Væntandi verður vøksturin í útflutninginum størri í seinna enn í fyrra hálvári 2024, eftirsum einki bleiv útflutt meðan verkfallið var, men væntandi verður útflutt seinni.

**Mynd 4.2: Fiskavøruútflutningur**
jan. 21 til jun. 24




**Viðm.:** Leypandi 12-mánaðar samanlegging. "Alifiskur" er laksur, síl og annar laksur, "Uppisjóvarfiskur" er svartkjaftur, sild, makrelur, "Botnfiskur" er toskur, hýsa og upsi.
**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í útflutningstølum hjá Hagstovuni

Uppsjóvarfiskur fevnir um makrel, sild og svartkjaft. Á mynd 4.2 sæst, at útflutningurin frá juni 2023 til juli 2024 var umleið 1,6 mia. kr., ið er ein minking á umleið 15% samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Minkingin stavar frá, at útflutningurin av fiskamjøli og lýsi var serliga stórur í 2023 vegna økta svartkjaftakvotu og at ein stórur partur av makrelinum varð landaður til ídnaðarvirki og útflutt sum millum annað fiskamjøl og lýsi. Væntandi verður ikki meira av lýsi útflutt restina av árinum; útflutningsvirðið av lýsi teir fyrstu 6 mánaðirnar av 2024, var slakar 100 mió. kr. Útflutningurin av fiskamjølið fellur væntandi eisini í 2024 samanborið í 2023.

Útflutningurin av botnfiski hevur verið rættiliga støðugur seinastu árini. Botnfiskur fevnir um tosk, hýsu og upsa. Útflutningurin í juni 2024 var umleið 1,4 mia. kr., ið er ein minking á umleið 8% í mun til sama tíðarskeið í 2023. Minkingin stavar millum annað frá, at kvotan í Barentshavinum er minkað.

Tveir triðingar av vøruútflutningurin (67%) fór í 2023 til evropeiska marknaðin, 10% til Russlands og 15% til USA, 6% til Asia og 2% til Afrika. Tað eru ymiskar orsøkir til, hvagar Føroyar útflytur til, eitt nú geopolitiskur ófriður, hvat keypiorkan er í keypslondunum og handilsavtalur. Eitt nú hevur Noreg handilsavtalu við Suður Korea, har nógvur makrelur fer. Føroyar hevur ikki slíka handilsavtalu, og Noreg stendur tí sterkari í kappingini, tá kappast skal um prís, tí Noreg sleppur undan at gjalda toll á vørunum til Norður Korea. Hetta er serliga viðkomandi í løtuni, um føroysku útflytararnar av uppsjóvarfiski hava ætlanir um finna nýggjar útflutningsmarknaðir til makrelin.

Fyri at tryggja ein støðugan búskap eigur tískil at vera arbeitt við at betra um handilsavtalurnar við onnur lond. Eitt nú vóru heilsumyndugleikar úr Brasilia í summar á vitjan í Føroyum, og tað er líkt til, at útlitini fyri at fáa eina veterinær-avtalu í lag við Brasilia er í nánd, ið kann hava við sær, at virkaðar vørur úr botnfiski verða útfluttar til Brasilia, ið hevur stóran eftirspurning eftir eitt nú saltfiski.

# 5. Almenna fíggjarstøðan og útlit

## Úrslitið á almennu roknskapunum

Mynd 5.1 gevur eitt yvirlit yvir roknskaparúrslit landskassans RLÚ I, bæði sum tað verður uppgjørt á fíggjarlógini, men eisini tá ið úrslitið verður rættað fyri tilfeingisinntøkunum, sum skulu í Búskapargrunnin (kallað "BG" í myndini), og sum politikkarnir ikki hava at ráða yvir. Harumframt vísir myndin landskassaúrslitið sum prosent av BTÚ. Búskaparráðið metir, at landskassans úrslit fyri 2024 verður eitt hall á 333 mió. kr. Metingin tekur støði í fíggjarlógini fyri 2024 íroknað játtaðar eykajáttanir higartil á 40 mió., sum vísir eitt hall á 36 mió. kr. Búskaparráðið metir, at tað burturav støðlingunum[11] av íløgum á 200 mió. kr., sum eru fluttar frá 2023, verða nýttar 100 mió. kr. í 2024 og 50 mió. kr. í 2025, og hesar upphæddir skulu tí leggjast afturat íløgunum hesi bæði árini. Umframt støðlingarnar, verða møguliga aðrar íløgur gjørdar á 12 mió. kr. í 2024 sambært Fíggjarmálaráðnum

**Mynd 5.1: Landskassaúrslitið RLÚ I, vanligir postar**
2020-2025




**Viðm.:** RLÚ í leypandi prísum og sum brøkur av BTÚ í leypandi prísum. BTÚ í leypandi prísum er uppgjørt fram til 2022, 2023-2025 eru metingar. RLÚ I er meting í 2024-2025.
**Kelda:** Gjaldstovan, Fíggjarmálaráðið og Búskaparráðið

Búskaparráðið hevur eisini minkað um søluinntøkuna av løgum, tí væntandi verður Teistin ikki seldur (30 mió. kr.) og ei heldur økið í Hoydølum (37 mió. kr.) í ár. Harafturat verður væntað, at tað verður ein meirrakstur á 43,5 mió. kr. í 2024. Avtala er gjørd millum Føroyar, Noreg og Stóra Bretland um makrelfiskiskapin, sum ger, at kvotan minkar og tí metir Búskaparráðið, at veiðigjaldið frá makrelinum lækkar við 74 mió. kr. í 2024. Orsakað av hesum broytingum verður hallið tí mett av gerast slakar 333 mió. kr. í 2024, sí talvu 5.1.

Tað kann hugsast, at inntøkurnar frá tilfeingisgjøldum eru yvirmettar, hóast hædd er tikin fyri at inntøkurnar frá veiðigjøldum frá makrelinum lækka. Grundin er, at møguliga verður ikki fiskað líka nógv sild sum ætlað. Harumframt hevur prísurin á laksi verið lágur seinastu mánaðirnir, tí kann væntast, at inntøkurnar frá tøkugjøldunum eisini verða lægri enn væntað.

[11] Støðlingar eru íløgur, sum eru játtaðar í undanfarnu árum, sum ikki eru framdar enn. Hesar íløgur kunnu koma afturat rakstrinum í sjálvum árinum. Av støðlingunum á 200 mió. kr. hoyra 100 mió. kr. til heilsuøkið, og her eru um til 83 mió. kr. til sjúkrahúsini. Knappar 39 mió. kr. eru íløgur á almenna- og mentamálaøkinum, 29 mió. kr. á fiskivinnu og samferðsluøkinum og 28 mió. kr. á barna og útbúgvingarøkinum.

**Talva 5.1: Munur í roknskapi, játtan og ætlan hjá landskassanum**

| | Rokskapur | Játtan |
|---|---|---|
| *Tús. Kr.* | **2023** | **2024** |
| RLÚ 1 úrslit | - 215.241 | 4.150 |
| Eykjattanir 2024 | | - 40.536 |
| **RLÚ 1 úrslit** | **- 215.241** | **- 36.386** |
| Nýtsla av støðlingum | | - 100.000 |
| Íløga | | - 12.000 |
| Minni søla av løgum | | - 67.000 |
| Mettar eykjattanir til rakstur | | - 43.500 |
| Minni inntøka av tilfeingisgjøldum | | - 74.000 |
| Tillagingar til 2025 fyri prís og lønarvøkstri | | |
| | **- 215.241** | **- 332.886** |
| Upphædd í búskapargrunn, sambært lóg | - 186.036 | - 223.299 |
| **RLÚ 1 úrslit** | **- 401.277** | **- 556.185** |

**Kelda:** Gjaldstovan, Fíggjarmálaráðið og Búskaparráðið

Hallið í 2025 er mett at gerast 41 mió. kr. Fyri fíggjarárið 2025 hevur Búskaparráðið tikið støði í fíggjarkørmunum hjá Fíggjarmálaráðnum fyri 2025, sum vísur eitt yvirskot á 9,2 mió. kr. Úrslitið frá kørmunum er áðrenn átøk at betra úrslitið og rættingar fyri flytingar í Búskapargrunnin. Búskaparráðið hevur við støðið í hesum trekt støðlingar á 50 mió. kr. frá, ið gevur eitt úrslit á -41 mió. kr.

Verður hædd tikið fyri, at ikki allar inntøkurnar frá veiði- og tøkugjaldinum eru tøkar hjá politikarunum at ráða yvir í inniverandi árið, tí ein partur sambært lóg skal í Búskapargrunnin, verður hallið upp aftur størri; tá verður tað ístaðin 401 mió. kr. í 2023, 556 mió. kr. í 2024 og 280 mió. kr. í 2025[12], ið merkir at undirskotið í 2024 er -2% av BTÚ, sí mynd 5.1.

Eitt endamál við Búskapargrunninum er at virka fyri at javna tilfeingisinntøkunar frá fiski- og alivinnuni. Hetta verður gjørt við at gjalda úr grunninum inn á fíggjarlógina á henda hátt; frá fiskivinnuni eru tað inntøkur upp til 250 mió. kr. sum verða útgoldnar landskassanum sama ár, meðan inntøkur omanfyri 250 mió. kr. árliga skulu javnast yvir 7 ár. Frá alivinnuni eru tað inntøkur upp til 150 mió. kr., sum verða útgoldnar landskassanum sama ár, meðan inntøkur omanfyri 150 mió. kr. árliga skulu javnast yvir 7 ár, sí fylgiskjal 2 í várfrágreiðingini frá Búskaparráðnum 2024, hvussu hetta verður gjørt.

Úrslitið á fíggjarlógini, sum hon er sett upp nú, vísur tí ikki rætta úrslitið. Hetta hevur Fíggjarmálaráðið, sambært Búskaparfrágreiðing I í sambandi við játtanarkarmarnar 2025-2029, ætlanir um at broyta, so úrslitið vísir rætt frameftir (frá 2025). Men samstundis sum tað verður gjørt, er ætlanin at hækka upphæddirnar, sum fara beinleiðis inn á fíggjarlógina. Fyri fiskivinnuna verður upphæddin hækkað frá 250 mió. kr. til 350 mió. kr. og fyri alivinnuna frá 150 mió. kr. til 250 mió. kr. Hervið gerast inntøkur landskassans uppaftur meira viðkvæmar yvirfyri sveiggjum í fiski- og alivinnuni, og endamálið við at javna tilfeingis- og tøkuinntøkur verður hervið í væl minni mun rokkið. Tað er skilagott at javna hesar inntøkur, tí tær kunnu sveiggja nógv frá ári til ár.

Stór hall á fíggjarlógini í 2024 og 2025 er eitt framhald av somu óhepnu gongd í almennu fíggjarstýringini. Úrslitini á fíggjarlógini eiga ikki at vísa so stór hall, tá hugsað verður um verandi konjunkturstøðu, hóast hædd verður tikið fyri demografiskt avgjørda vøkstrinum í vælferðarútreiðslum. Landsstýrið eigur at gera langtíðarætlanir fyri fíggjarligu gongdina hjá landskassa og kommunum undir einum, tí stórar avbjóðingar eru fyri framman orsakað av demografisku gongdini. Heilt ítøkiliga vil ein nýskipan, har pensjónsaldurin verður hækkaður og frameftir fylgir væntaðu økingini í livialdrinum, saman við effektiviseringum í almenna geiranum, gera stóran mun til at tryggja fíggjarpolitiska haldføríð.

[12] Úrslitið í 2025 er roknað út sambært verandi lóg. Tvs. at hædd er ikki tikin fyri broytingin, sum landstýrið ætlar at gera í sambandi við Búskpargrunnin, sambært játtanarkørmunum fyri 2025.

Eisini kommunurnar hava hall samlað sæð og hava tær havt hall líka síðani 2018, sí talvu 5.2. Í grein 40 í Kommunustýrislógnini og viðmerkingarnar til hesa stendur, at kommunurnar fyrst skulu meta um útreiðslurnar tær hava fyri komandi ár og út frá hesum áseta skattaprosentið. Men í veruleikanum verður allarhelst gjørt umvent; at útreiðslan verður ásett eftir inntøkunum av einum ávísum skattaprosenti. Skipanin eggjar tískil kommununum til at føra konjunkturviðgangandi fíggjarpolitikk. Tær brúka allan peningin ímeðan tað gongur væl og inntøkurnar veksa (seta ikki skattin niður), og tátta í tá tað gongur verri. Skilagott hevði verið, um tað ístaðin var ein samlaður karmur fyri land og kommunur undir einum, umframt eitt hámark fyri útreiðsluvøksturin, sí meira í brotinum um fíggjarpolitiskt regluverk.

Kommunurnar hava gjørt nógvar íløgur seinastu árini sambært talvu 5.2, men sambært kommunufelagnum er lítið gjørt á eldraøkinum. Íløgur í eldraøkið skulu tryggja, at raksturin verður so effektivur sum møguligt hjá kommunum, tí eldrarøktin fer at økjast nógv komandi árini. Neyðugt er tí, at landsstýrið ger langtíðarætlanir fyri fíggjarligu gongdina, ikki bara fyri landskassan, men eisini fyri kommunurnar, tí stórar avbjóðingar eru fyri framman orsakað av demografisku gongdini. Tað er ikki nokk at pjøssa uppá fíggjarlógina við ónevndum átøkum á 35 mió. kr. um árið, sum ætlanin er sambært kørmunum hjá Fíggjarmálaráðnum. Neyðugt er við nýskipanum, sum veruliga muna, um fíggjarpolitikkin skal fáast aftur á beint.

**Talva 5.2: Úrslit hjá kommunum**
2018-2023

| *Tús kr.* | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 2.417 | 2.605 | 2.690 | 2.714 | 2.923 | 3.112 |
| Rakstur | 1.872 | 1.997 | 2.147 | 2.207 | 2.318 | 2.494 |
| Løgur | 658 | 784 | 819 | 583 | 639 | 813 |
| **Úrslit** | **- 113** | **- 176** | **- 277** | **- 75** | **- 34** | **- 195** |

**Kelda:** Gjaldstovan

## Nýtslan hjá almennari fyrisiting og tænastu

Mynd 3.2 vísir gongd og vøkstur í nýtsluni hjá almennari fyrisiting og tænastu, sum uppgjørt í tjóðarroknskapinum. Nýtsluútreiðslur hjá almennari fyrisiting og tænastu fevna um nýtsluútreiðslur hjá landi, kommunum, sosialum grunnum og ríki, men ikki fyritøkum undir almennum ræði. Tølini fyri 2024-2025 byggja á metingar . Árini 2020 - 2022 veksur almenna nýtslan um 5% árliga, sum er ein stórur vøkstur í hákonjunkturi, tá inflatión framvegis var lág. Í 2023 var vøksturin 7,6%. Vøksturin verður mettur at verða 6% í 2024 og 5% í 2025. Tað eru í størstan mun lønarútreiðslur á vælferðaøkinum, t.d. í heilsu- og almannaverkinum hjá landinum, sum økjast, ið gera seg galdandi fyri árini 2024 – 2025, bæði vegna lønarhækkingar og lønarlyft til summar fakbólkar, og somuleiðis veksa útreiðslurnar til fólkapensjónir orsakað av vaksandi tal av pensjónistum. Lønargjaldingar eru eisini mettar at økjast hjá kommununum hesi bæði árini, sum millum annað røkja eldraøkið og barnaansing.

**Mynd 5.2: Nýtsluútreiðslur hjá almenna geiranum**
2020-2025




**Viðm.:** Uppgerð hjá Hagstovu Føroya árini 2020-2022. 2023 er ikki endaliga uppgjørt, men byggir á bókað roknskapartøl frá .02.2024. 2024-2025 eru egnar metingar.
**Kelda:** Hagstovan og Búskaparráðið.

## Íløgur almenna geirans

Mynd 5.3 vísir íløguútreiðslurnar, sum eru undir almennum ræði, tað vil siga hjá landi, kommunum, sosialum grunnum og ríki, umframt fyritøkum undir almennum ræði undir einum. Talan er um íløgur samsvarandi tjóðarroknskaparuppgerð og ikki roknskaparuppgerð. Tjóðarroknskaparligu íløgurnar eru størri enn roknskaparligu íløgurnar; m.a. er alt Landsverk og viðlíkahald, herundir keyp av útbúnaði, sum eru rakstrarkostnaðir í landskassaroknskapinum, roknað sum íløgur í tjóðarroknskapinum.

**Mynd 5.3: Íløguútreiðslur undir almennum ræði í mió. kr.**
2020-2025




**Viðm.:** Uppgerð hjá Hagstovu Føroya árini 2020-2022 fyri land og kommunur og íløgur hjá marknaðarframleiðandi fyritøkum undir almennum ræði. 2023 er ikki endaliga uppgjørt, men byggir á bókað roknskapartøl frá 14.02.2024. 2024-2025 eru egnar metingar fyri almennar íløgur.
**Kelda:** Hagstovan og Búskaparráðið.

Landið økir sínar íløgur frá 2022 til 2023 við um 3%. Í 2024 eru íløgurnar á leið tær somu sum í 2023 meðan tær fella í 2025. Kommunurnar økja sínar íløgur fitt frá 2022 til 2024. Íløgurnar hjá kommunum í

2023 og 2024 svara til omanfyri 25% av inntøkunum hjá kommununum, sum er rættuliga nógv. Í 2025 fella íløgurnar hjá kommunum eitt vet, men tær eru framvegis um 20% av inntøkunum.

Eldraøkið liggur hjá kommunum, og tað verða munandi fleiri eldri næstu nógvu árini. Tað er tó líkt til at tær flestu kommunurnar enn ikki hava lagt nakrar langtíðarætlanir fyri eldraøkið, hóast tað er alneyðugt. Avbjóðingin er stór, og tað hevði verið skilagott, um politisku myndugleikarnir endurskoðaðu skipanina av hesum økinum. Kommunurnar eru 29 í tali og sera ymiskar, bæði í aldursamanseting av íbúgvunum og inntøkugrundarlagnum, og ivasamt er, um allar makta hesa avbjóðing. Neyðugt er undir øllum umstøðum at endurskoða fíggingina av eldraøkinum.

Íløguútreiðslur hjá fyritøkum undir almennum ræði tvífaldast frá 2023 til 2024. Hesin vøkstur stavar serliga frá øktum íløguvirksemi hjá SEV, Vága Floghavn og Atlantic Airways. Íløguútreiðslurnar halda høga støðið í 2025.

Tað er umráðandi, at tað almenna undir einum strembar eftir eini støðugari gongd í almennum íløgum fyri at stabilisera gongdina í búskapinum. Sum myndin vísir, hevur tað ikki gingið væl at halda eina javna íløgugongd. Bæði land og kommunur hava tørv á miðvísari stýring og samskipan av íløgum, eins og tørvur er fyri samskipan av íløguvirksemi hjá fyritøkum undir almennum ræði. Tað hevði verið skynsamt, um politiska skipanin legði eina ítøkiliga íløguætlan hjá øllum almenna geiranum undir einum. Hetta merkir samstundis, at politiska skipanin má raðfesta millum allar almennu íløgurnar, ið liggja fyri framman.

## Fíggjarpolitiskt regluverk

Endamálið við einum fíggjarpolitiskum regluverki er, at tryggja ein skilagóðan og haldføran fíggjarpolitikk. Søguliga hevur tað víst seg, at almenna nýtslan hevur fylgt almennu inntøkunum, og verður hugt frameftir, hvussu almenna fíggjarstøðan sær út undir verandi fíggjarpolitikki, vísir haldførisútrokningin[13] hjá Búskaparráðnum, at fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur. Verða átøk ikki framd, fer almenni geirin sum frálíður at fáa eitt áhaldandi og veksandi hall, og fíggingartørvurin fer komandi 40 árini at svara til 45 mia. kr. tilsamans. Búskaparráðið mælir til at politiska skipanin fremur nýskipanir og ger átøk, sum økja um inntøkurnar og minka um útreiðslur í almenna geiranum, fyri at almenna skuldin ikki áhaldandi skal veksa.

Eitt stig, ið politiska skipanin skal gera, fyri at taka hond um fíggjarpolitisku avbjóðingina, er at seta í verk er eitt fíggjarpolitiskt regluverk fyri land og kommunur undir einum. Á henda hátt fæst tamarhald á útreiðsluvøkstrinum. Tað hevur við sær, at eitt hámark skal setast fyri, hvussu nógv almennu rakstrarútreiðlsurnar kunnu veksa árliga, soleiðis at útreiðsluvøksturin ikki av sær sjálvum fylgir inntøkuvøkstrinum. Soleiðis fæst javnvág millum útreiðslur og inntøkur í langa høpinum.

At hava eitt hámark fyri, hvussu nógv almennu rakstrarútreiðslurnar kunnu veksa, lættir um trýstið á politikararnar at økja um almennu nýtsluna og íløgurnar, tá ið tað gongur væl í búskapinum, og økir harafturat um kredittvirðið hjá landinum, tí regluverkið ger politisku skipanina betri føra fyri at halda rakstrarútreiðsluvøksturin undir einum hámarki.

Tað er neyðugt hjá almenna geiranum at fara undir eitt tíðarskeið við nýskipanum. Kanningar av tílíkum átøkum í øðrum londum benda á, at greið regluverk kring fíggjarpolitikkin, kunna gera tað lættari at fremja tílík átøk í verki og halda fast.

Danmark hevur eitt fíggjarpolitiskt regluverk, sum eitur "Budgetloven". Óhaldføra fíggjarstøða landsins og trupulleikar við at stýra almenna nýtsluvøkstrinum, var orsøkin til, at Danmark setti í verk hetta regluverkið. "Budgetloven" varð samtykt í 2012 við virkna frá fíggjarárinum 2014 sum eitt aftursvar til áhaldandi ovurnýtslu í almenna geiranum, og tí kommunurnar og regiónirnar høvdu ov lítið afturhaldni og lótu almennu útreiðslurnar veksa í hákonjunkturinum fram til fíggjarkreppuna í 2008. Danska "Budgetloven" ásetur millum annað, at eitt ovara mark fyri almennu útreiðslurnar skal samtykkjast fyri

[13] Sí temafrágreiðing Búskaparráðsins um fíggjarpolitiskt haldføri frá januar 2024.

eitt 4-ára tíðarskeið, og at fíggjarætlanirnar skulu leggjast til rættis innan fyri hetta ovara markið. Harafturat eru revsitiltøk móti kommunum og regiónum, um tær, í hvørjum einstøkum fíggjarári, ikki yvirhalda avtaluna við donsku stjórnina um markið fyri almennu útreiðslurnar. "Budgetloven" hevur ført til at tað er tamarhald á almenna útreiðsluvøkstrinum í Danmark; áðrenn hildu ætlanirnar fyri almennu nýtsluni sjáldan, og eftir at revsitiltøk vórðu settar í verk, hevur samsvar verið millum játtan og veruliga nýtslu[14].

Føroyska støðan nú er meinlík hesum. Fíggjarpolitikkurin er óhaldførur og almennu útreiðslurnar økjast uttan íhald. Stundin er tí komin til at seta í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk fyri Føroyar. Serliga viðkomandi er hetta, tá politiska skipanin hevur íløguætlanir í almenna geiranum fyri meira enn 100% av BTÚ sambært eini samanteljing hjá Fíggjarmálaráðnum í teirra frágreiðing til jattanarkarmar 2024.

Búskaparráðið skjýtur upp, at politiska skipanin í eini breiðari semju setur sær mál fyri bygnaðarliga úrslitið hjá almenna geiranum 10 ár fram í tíð. Málið fyri úrslitið hjá almenna geiranum skal vera í samsvar við ein haldføran búskap í langa høpinum hjá landi og kommunum undir einum. Tá tað er gjørt, verður mett um inntøkurnar í hesum tíðarskeiði og síðani verður roknað út, hvørjar útreiðslur inntøkurnar røkka til, treytað av, at málið fyri úrslitið verður rokkið. Landið eigur í hesum sambandi at samráðast við kommunurnar um ein útreiðslukarm fyri til dømis eitt fýra ára tíðarskeið, ið liggur fastur, men sum kommunurnar frítt kunnu raðfesta innanfyri.

Vísa metingarnar í roynd og veru, at útreiðslurnar til eitt nú vælferðarøkið, vegna veksandi talið av eldri fólki, fara at taka ein ov stóran part av væntaðu inntøkunum, mugu nýskipanir verða framdar. Er ikki ynski um at fremja nýskipanir, er neyðugt at politiska skipanin greiðir frá, hvussu nógv ávísar almennar tænastur og veitingar skulu skerjast, ella hvussu nógv skatturin skal hækka, fyri at røkka málinum fyri úrslitið í 2035. Eftirfylgjandi samráðast land og kommunur um ein útreiðslukarm, ið fevnir um eitt styttri tíðarskeið, til dømis 4 ár. Útreiðslukarmurin liggur fastur, men kommunurnar kunnu frítt raðfesta innanfyri karmin, sum teimum lystir. Karmurin skal vera treytaður av, at málið um javnvág í 2035, verður rokkið.

Tað er umráðandi, at regluverkið er greitt, einfalt og lætt skilligt. Harafturat er umráðandi, at kommunali geirin eisini er fevndur av regluverkinum. Neyðugt er at tað fær avleiðingar um regluverkið ikki verður hildið. Viðmælt verður, at so hvørt sum politisk tiltøk verða skotin upp, skal politiska skipanin í hesum sambandi framskriva almennu inntøkurnar og útreiðslurnar, 10 og 20 ár fram, so tað verður avdúkað, hvussu tiltakið ávirkar inntøkurnar og útreiðslurnar. Tað við siga at eitt hvørt politiskt uppskot, skal vísa á, hvat tað kemur at kosta landskassanum fram í tíð, og hvussu tað verður fíggjað.

[14] De Økonomiske Råd, dors.dk.

## Keldur

ALS, ársfrágreiðing 2023

Avrik sp/f, Hvalvík

Betri Banki

Betri Heim

De Økonomiske Råd

ECB

Felagið Nótaskip

Fishpool.eu

Fíggjarmálaráðið

Føroya Banki

Gjaldstovan, Búskaparskipan Landsins (BSL) og landsroknskapurin

Hagstova Føroya

Havstovan

International Monetary Fund, IMF

Kommunufelag Føroya

Landsbanki Føroya

Samrøður við fyritøkur í fiskivinnuni

Samrøður við fyritøkur í alivinnuni

Vinnuhúsið

Visit Faroe Islands

Vørn

# Fylgiskjal

**Talva F.1 Vakstrarískoyti av endaligari frágongd og vøkstur í BTÚ (%)**

| | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|
| Privat nýtsla | 2,1 | 3,2 | 3,5 | 2,8 | 2,5 |
| Almenna nýtsla | 1,4 | 1,1 | 2,1 | 1,8 | 1,5 |
| Privatar íløgur | 4,2 | 4,4 | 1,0 | -0,8 | 1,2 |
| Almennar íløgur | -1,7 | -0,6 | 0,7 | 0,3 | -0,9 |
| Goymslubroytingar | -0,3 | 2,0 | -2,2 | -1,3 | 2,2 |
| Útflutningur | 9,1 | 15,7 | 0,1 | 0,5 | -1,6 |
| Innflutningur | -7,2 | -16,3 | 0,3 | 1,5 | -1,7 |

**Viðm.:** 2021 og 2022 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2023, 2024 og 2025 eru metingar hjá Búskaparráðnum.
**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið

# English summary

The Economy Still Under Pressure The Economic Council has provided an updated forecast of the GDP growth for the years 2024–2025. The GDP growth forecast for 2023–2025 is in current prices and is estimated to be 5.6% in 2023, 4.7% in 2024, and 3.3% in 2025.

The real economic growth for 2023 has not yet been finalized, and the GDP estimates for 2023, 2024, and 2025 are only in current prices. The trend in the number of employees can give an indication of real growth; the number of employees has increased in recent years. The number of employees grew by 1% in the period from July 2023 to June 2024, compared to the same period the previous year. The estimated growth in current prices is around five percent, while inflation is currently three percent. The growing activity is also reflected in the fact that the number of foreign workers in the labor market continues to grow. Finally, it can be pointed out that wage payments have increased by 6% in the 12-month period up to June 2024, compared to the same period the previous year.

**GDP and GDP Growth in Current Prices**

| | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|
| GDP mil. DKK | 22,980 | 25,162 | *26,578* | *27,822* | *28,730* |
| GDP growth p.a | 7.7% | 9.5% | *5.6%* | *4.7%* | *3.3%* |

Note: 2021 and 2022 are official GDP releases by Statistics Faroe Islands. 2023, 2024, and 2025 are estimates by the Economic Council.
Source: Statistics Faroe Islands and the Economic Council

The household confidence index is higher in the latest consumer survey from Statistics Faroe Islands compared to the January 2024 survey, which may be related to wage increases, tax reductions, and prospects for lower interest rates. Prices are no longer rising at the same pace as they did two years ago, and the consumer price index increased by 3.0% in the second quarter compared to the same quarter last year. The price increase was primarily due to housing interest costs and the price of fuel oil. Food prices also increased but at a slower pace than in the past two years. There is work for everyone, and unemployment remains very low; it was 1.1% in July 2024.

The good confidence of households is also reflected in the confidence index for both the trade and service industries. In the construction industry, it is expected that the demand for labor will decrease in the coming year, but the number of months with secured work remains unchanged. On the other hand, confidence in the resource industries has somewhat decreased. The quotas for both herring and mackerel have been reduced in 2024 compared to 2023, partly due to the new coastal states agreement on mackerel. Likewise, the cod quota in the Barents Sea will decrease in 2024 and 2025. However, the salmon harvest has increased, and together with an increased blue whiting quota, exports overall are helping to drive GDP growth in 2024.

Imports decreased in the first half of 2024 compared to the same period the previous year, partly due to lower imports of ships, raw materials, and fuel. Exports also decreased, but not as much as imports, so balance of trade is in surplus (June 2024).

Real estate agents report that first-time buyers are having difficulty entering the housing market, especially in the capital region. Many are looking outside the capital region for the same reason. Additionally, the cost of materials when building houses has risen significantly, making people hesitant to build new houses. The shortage of housing is a significant bottleneck, hindering continued population and economic growth in the Faroe Islands. Therefore, municipalities with significant population growth should expedite the development of land plots, especially for building apartments and other smaller housing units, to meet the urgent need more quickly. The government should also contribute by building rental housing.

There is a strong demand for labor, and one way to increase the labor force in the Faroe Islands is to attract foreign workers. Labor market policies should ensure that foreign workers coming to the Faroe Islands meet a need that is high productive value-creating for the Faroese economy. Many of the workers who have come to the Faroe Islands through the Fast Track system from third countries work in fish processing plants, and they are covered by the fish factory system (FV), which is a system that provides unemployment benefits during periods of inactivity at fish factories due to factors such as a lack of raw materials. To qualify for FV benefits, the workplace must be approved by the Faroese Unemployment Office (ALS) under the FV system. According to the lates annual report from ALS, about 1,500 people were in the fish factory system in 2023, of which around 40% were foreigners. According to ALS, there are even cases where unemployment benefits are essentially the basis for some foreigners' stay in the Faroe Islands. The fish factory system also hinders workers from seeking employment in industries where they would contribute more to the economy and value creation in the Faroe Islands. Systems like the fish factory system which all wage earners and employers in the Faroe Islands help fund, should not be used to ensure that employers can meet the 40-hour workweek requirement.

The labor shortage will continue to grow for many years due to demographic trends. Raising the retirement age increases the labor supply. If the retirement age is not increased as life expectancy grows, it will lead to an imbalance between rising pension costs and the relatively fewer tax revenues from work incomes. The remaining life expectancy as a pensioner has already increased by four years since 1988 because the retirement age has not been adjusted to the increasing life expectancy. Therefore, it is necessary to accelerate the adjustment between working life and retirement life. This is crucial for ensuring the sustainability of the fiscal policy.

The Economic Council estimates the budget deficit to be around 560 million DKK in 2024 and 280 million DKK in 2025, considering that not all the revenues from fishing and aquaculture fees will be available for political authorities to control in 2024 and 2025, as a portion must go into the Economic Fund. One purpose of the Economic Fund is to smooth out tax income from the fishing and aquaculture industries. This is done by paying 250 million DKK from the fund into the budget each year from the fishing industry and 150 million DKK from the aquaculture industry. Revenues from fishing and aquaculture that exceed these amounts go into the Economic Fund and are spread over seven years. However, the Ministry of Finance plans to increase the amounts going directly into the fiscal budget. For the fishing industry, the amount will be raised from 250 million DKK to 350 million DKK, and for the aquaculture industry from 150 million DKK to 250 million DKK. This means that the state’s revenue will become even more vulnerable to fluctuations in the fishing and aquaculture industries, and the goal of smoothing out revenues from fishing and aquaculture fees will be diminished.

The government should develop long-term financial plans for both the national and municipal budgets, as there are significant challenges ahead due to demographic developments. It is not enough to patch up the budget with vague measures worth 35 million DKK per year, as planned, according to the framework from the Ministry of Finance. Major reforms that truly make a difference are needed to get fiscal policy back on track. A specific reform, where the retirement age is raised and thereafter follows the expected increase in life expectancy, along with efficiency improvements in the public sector, will make a significant contribution to ensuring fiscal sustainability.

Fiscal policy rules have returned to the political agenda in the Faroe Islands. In the Prime Minister’s ólavsøka speech (opening parliamentary speech), it was announced that the coalition aims to “reach an agreement on fiscal policy rules that limit how much money we politicians can spend and ensure that everything we do is funded.” The Economic Council fully supports this and once again urges the political system to implement such fiscal policy rules. It can be pointed out that such rules are already legislated in most of the neighboring countries.

It must also be noted that about one-third of public spending is managed in the municipal sector. Therefore, it is essential that a fiscal policy framework covers the entire public sector and not just the national financial management.